*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 1 | Februar 2024 | pedagogfelag.fo



**Steðgur í samráðingunum**

**Eitt virkið samráðingarár - nevndarfrágreiðingin**

**Frágreiðingar frá ráðunum**

**Valgreinar**

*Aðalfundarblaðið*

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent
www.foroyaprent.fo

Upplag
2.100 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Skrivari
annika@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Nevndarlimur
harald@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

**5** Steðgur í samráðingunum

**6** Eitt virkið samráðingarár

**13** Skráin til aðalfund felagsins

**15** Løn, eftirløn og arbeiðsumstøður eru aðalmál

**19** Pedagogfelagið treingir til nýggjan ham

**23** Frágreiðing frá Hjálparfólkaráðnum

**19** Pedagogfelagið treingir til nýggjan ham

**23** Frágreiðing frá Hjálparfólkaráðnum

**24** Ráðsaðalfundirnir eiga at flytast

**25** Frágreiðing frá Leiðararáðnum

**26** Tað skal vera tíð til kjak

**27** Frágreiðing frá Námsfrøðingaráðnum

**28** Umboðan og Ávirkan eru lyklaorðini

**31** Seniorpolitikkur, Frítíðarnámsfrøði, Sernámsfrøði

**33** Pengar! pengar! pengar!

**35** Tað er ríkiligt at tríva í

**37** Leiðararáðið skal styrkjast

**39** Leikluturin hjá ráðunum eigur at styrkjast

**40** Ráðið er ein longdur armur hjá nevndini

**41** Vakin og virkin og fokus á leiðslu

**42** Ein menniskjarættur at verða sædd og hoyrd

**43** Soleiðis virkar valskipanin

# ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

## VAL, TRUPLAR SAMRÁÐINGAR OG VÆLFERÐARAVBJÓÐINGAR

So upprann løtan, tá avrikini aftur skulu metast á vágskálini. Á aðalfundinum í ár er tað avbjóðandi, at fleiri val enn vanligt skulu avgreiðast, áðrenn vit rættiliga hava fingið fótafesti í skipanini við teimum trimum ráðunum.

Tá freistin at stilla upp var farin, var greitt, at hetta verður ein spennandi aðalfundur hjá nógvum, og blaðið er sjálvsagt merkt av nógvu valunum, eins og aðalfundurin verður tað.

Forfólkaval og nevndarval kunnu merkja, at leiðsla felagsins longu í næsta mánað sær heilt øðrvísi út enn nú.

Tíverri er áhugin at bjóða seg fram ikki eins stórur í øllum ráðunum. Tað er sostatt longu greitt, at hvørki Námsfrøðingaráðið ella Hjálparfólkaráðið kunnu fullmannast við valevnunum, sum nú eru. Vónandi fer tað at eydnast at fáa fleiri at bjóða seg fram til hesi ráðini á aðalfundunum hjá teimum.

Aðalfundurin hjá Pedagogfelagnum er sermerktur við tað, at luttøkan vanliga er lutfalsliga stór. Aðalfundurin í fjør var ein av teimum heilt stóru í so máta, sjálvt um tað hvørki vóru val ella serlig stórmál á skrá.

Í øðrum feløgum undrast nógv á, at hugurin hjá okkara limum at møta á aðalfundi er so stórur. Eg veit heldur ikki við vissu, hví so er, men frøist almikið um tað. Tað er gott og sunt fyri felagið, at so nógv eru góð við tað og hava meiningar um, hvørja leið vit skulu fara. Fólkaræðið í Pedagogfelagnum hevur tað gott.

Tað er heldur sjáldsamt at fara til aðalfundar mitt undir sáttmálasamráðingum.

Í skrivandi stund er tað enn óvist, hvussu gongdin fer at verða við samráðingunum. Tí eru framtíðar lønar- og sáttmálaviðurskiftini hjá tykkum limum eisini ógreið enn, og tað eri eg ómetaliga harmur um. Eitt er vist, politikarar og embætisverk tosa ikki altíð sama mál.

Í januar sóu vit, tá boðað var frá ódnarveðri, at boð vóru eftir tykkum eins og undir koronufarsóttini, meðan aðrir starvsbólkar vórðu sendir til hús at arbeiða ella halda frí. Tit eru ein stórur, týðandi partur av grundarlagnum undir vælferðarsamfelagnum, og tað eigur og skal síggjast aftur í sáttmálasamráðingunum. Tíverri tykjast tær frá arbeiðsgevarans síðu fyrst og fremst at verða stýrdar av einum karmi, sum tey tvíhalda um, men sum er gjørdur til eitt annað tíðarskeið. Afturat verður so alt órógvað av einum lønarlyfti, sum tey hava útroknað undir skeivum fortreytum.

Vælferðarsamfelagið hevur ógvusligar avbjóðingar at dragast við. Vit hava starvsfólktrot í flest øllum vælferðartænastunum, og forsøgnirnar siga, at tørvurin bara fer at vaksa. Ein partur av loysnini er, at vit øll skulu verða verandi á arbeiðsmarknaðinum longri, sigur almenni arbeiðsgevarin – tað er politikararnir. Men ongin ætlan er fyri, hvussu øll skulu kunna megna tað. Tað er í hvussu er væl og virðiliga skjalprógvað, at arbeiði í flest øllum vælferðartænastum, um tað er á dag-



stovnaøkinum, í Almannaverkinum ella aðrastaðni, er ógvuliga krevjandi bæði kropsliga og sálarliga.

Galdandi eftirlønaraldur er tí ein avbjóðing hjá nógvum longu í dag, og fleiri noyðast at gevast, áðrenn pensjónsaldurin er rokkin. Tí er tað alneyðugt, at samfelagið tekur størri ábyrgd á seg at tryggja arbeiðsumhvørvið og ikki bara skúgvar tann spurningin frá sær við at siga, at talan er um ein samráðingarspurning. Tí tá vita vit, at allir batar, ið áttu at verið sjálvsagdir, skulu mótroknast í einum lønarkarmi.

Pedagogfelagið hevur í dag góðar 2000 limir, og bygnaðurin í felagnum er eisini eitt evni á aðalfundinum. Spurningurin er, um felagið røkkur nóg væl út at tæna áhugamálunum hjá stóra og fjølbroytta limaskaranum. Verandi bygnaður við teimum trimum ráðunum kom í gildið miðskeiðis í 2019. Stutt eftir rakti koronufarsóttin, og tí hava ráðini í roynd og veru bert havt eitt ár ella stívliga tað at royna seg. Tíðin er tó búgvin at eftirmeta skipanina.

*Við hesum ynski eg tykkum øllum ein góðan aðalfund.*

# Tað kann vera freistandi at spara limagjaldið burtur

## Men um øll gera tað, hvør skal so tryggja tær ...

- Samráðingar vegna teg
- Løn
- Arbeiðstíðarviðbøtur
- Eftirløn
- Rætt til frítíð og feriu
- Arbeiðsloysisstuðul
- Álitisfólkaskipan
- Fleiri útbúgvingarmøguleikar
- Fakligt umhvørvi
- Virðing fyri námsfrøðiliga fakinum
- Løgfrøðiliga hjálp
- Góða samlagstrygging



## GÓÐSKA KOSTAR

**Tú kanst vera við til at tryggja, at meira enn 100 ára langt fakfelagsstríð ikki sindrast burtur.**

FØROYA PEDAGOG FELAG

**Gerst limur og les meira á:**
**www.pedagogfelag.fo**

# Steðgur í samráðingunum

**Samráðingarnar ganga ongan veg kortini, og við virðing fyri forfólka- og nevndarvalinum hevur nevndin í Pedagogfelagnum gjørt av seta sáttmálasamráðingarnar á pausu til eftir aðalfundin**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Beint fyri evstamark hjá Pedagogblaðnum 7. februar frættist, at sáttmálasamráðingarnar ímillum felagið øðrumegin og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hinumegin eru steðgaðar til eftir aðalfundin hjá Pedagogfelagnum 2. mars.

Jógvan Philbrow, formaður, sum sjálvur stendur fyri vali eins og tveir av nevndarlimunum, sigur, at tað er í virðing fyri, at bæði forfólkið og partur av nevndini kunnu verða skift út, at samráðingarnar nú verða steðgaðar fyribils.

– Samráðingarnar ganga ongan veg kortini, so nevndin er vorðin samd um, at tað rættasta er at steðga á og bíða til eftir aðalfundin at samráðast víðari. Hvør tá skal sita við borðið fyri Pedagogfelagið, fer úrslitið av forfólka- og nevndarvalinum so at gera av, sigur Jógvan Philbrow.

Tað er ongin loyna, at samráðingarnar higartil at kalla ikki hava flutt seg, og avgerðin um steðgin varð tikin eftir samráðingarfundin, sum var mikudagin 7. februar.

Onki fæst at vita um, hvat tað ítøkiliga verður togast um, men tað hevur fyrr verið frammi, at arbeiðstíðarreglur eru eitt høvuðsmál hjá Pedagogfelagnum í samráðingunum umframt sjálvan lønarspurningin.

## Arbeiðstíðarreglur

Felagið hevur bara eina gamla avtalu frá 2008 við Fíggjarmálaráðið um arbeiðstíðarreglur fyri stovnarnarnar á serøkinum, men vil fegin hava arbeiðstíðarreglur fyri øll starvsøkini.

Í seinasta Pedagogblaði, sum kom út beint fyri jól, segði Jógvan Philbrow soleiðis um støðuna:

"Stóri trupulleikin er, at vit snøgt sagt ongar brúkiligar reglur hava um arbeiðstíðina á øðrum arbeiðsøkjum. Nógv tað størsta av teimum er sjálvand dagstovnaøkið, men tað er eisini hent øgiliga nógv síðan 2008. Til dømis í fólkakúlanum, har støðugt fleiri námsfrøðingar arbeiða. Vit hava jú fingið forskúlar, og fleiri sertilboð verða ment. Allar bygnaðarbroytingarnar í Almannaverkinum seta eisini øðrvísi krøv til arbeiðstíð."

## Frágreiðing frá nevndini 2023

# EITT VIRKIÐ SAMRÁÐINGARÁR

Góðu limir í Føroya Pedagogfelag, uttan tykkara stríð var lítil meining í einum fakfelag sum okkara.

Vit eru takksom fyri møguleikan at umboða tykkum, og er málsetningurin at gera tykkara arbeiðslív tryggari, greiðari og gevandi, serliga fíggjarliga.

Í byrjanini av aðalfundarárinum settu vit okkum fyri serliga at leggja dent á at arbeiða við útbúgving, samleikanum og arbeiðsumstøðum, umframt sáttmálasamráðingum sjálvsagt.

### Útbúgving

Felagið hevur leingi víst á tørvin á fleiri útbúnum námsfrøðingum, og í fjør var peningur endiliga settur av at taka fleiri námsfrøðislesandi inn á Setrið. Men hóast rúm var fyri, at umleið 60 lesandi kundu byrja eftir summarfrítíðina, vórðu bert 44 lesandi tikin inn, tá avtornaði. Undirtøkan at lesa námsfrøði er minkað hesi seinastu árini, og tað sær út, sum at hetta er eitt rák, ið eisini er aðrastaðni í Norðurlondum.

Tórshavnar kommuna hevur tikið eitt heldur óvanligt stig við tað, at hon hevur gjørt av at stuðla undir, at hjálparfólk í starvi hjá kommununi sleppa at útbúgva seg við lestri á netinum á einum donskum lærustovni. Sjálvandi heilsa vit hesi roynd vælkomnari, tó at vit helst vildu, at tað var ein útbúgving, sum okkara Fróðskaparsetur Føroya stóð fyri. Stigið, sum her er tikið, vísir bara, at vit hava tørv á útbúgivngartilboðum í Føroyum, har tað ber til at fáa starvsroyndir, skeið og aðra fakvitan góðskrivað. Somuleiðs er neyðugt at hava skipanir, ið stuðla undir, at tilkomin við fíggjarligum skyldum í størri mun enn nú kunnu fara undir útbúgving.

Námsfrøðihjálparaútbúgvingin í Suðuroy er framvegis ikki tillagað soleiðis, at hon gevur atgongd til framhaldandi lestur á Setrinum. Næmingarnir mangla nøkur miðnámsskúlafak fyri at kunna útbúgva seg víðari í Føroyum. Hetta er eitt mál, sum vit framvegis royna at loysa, tí vit vita, at fleiri av teimum, ið lesa til námsfrøðishjálpara, ynskja at lesa víðari til námsfrøðing.

Vit hava eisini verið á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum til kunning og kjak um námsfrøðisútbúgvingina, og har sjóneykan var sett á námfrøðingaútbúgvingina í einum panelkjaki.

Felagið hevur nú í fleiri ár skipað fyri einum tiltaki fyri nýútbúnum námsfrøðingum, har teir verða kunnaðir um sáttmálaviðurskifti, og hvørji viðurskifti annars skulu havast í huga, tá byrjað verður í nýggjum størvum.

Prógvhandan til námsfrøðihjálparar var fyri fyrstu fer á Heilsuskúlanum í Suðuroy í juni, og tá fingu vit okkara allarfyrstu føroyskt útbúnu námsfrøðihjálparar.



*Nevndin í Føroya Pedagogfelag avmyndað eftir aðalfundin í fjør. Úr vinstru eru tað Gunnvá Akraberg Hansen, nevndarlimur, Nikkil Heinesen, næstformaður, Jógvan Philbrow, formaður, Annika Østerø, skrivari, og Harald Joensen, nevndarlimur*

*Mynd: Pavla Eliasen - Fotostudio*

Prógvhandanin til nýútbúnu námsfrøðingarnar á Setrinum í Havn fer nú fram á ein øðrvísi hátt enn fyrr, tí nú fáa øll prógv samstundis har.

Vit halda, at alt tað, sum seinastu tíðina er hent á útbúgvingarøkinum, er tekin um, at politikararnir hóast alt hava skilt, at meira skal til, og at tørvurin á námsfrøðingum og fakførleikum bara økist. Í miðlunum hava vit eisini hoyrt almennu stjórarnar víst á tørvin á fakfólkum.

## Sjónligt felag

Sum ein lið í arbeiðnum við samleikanum hava vit sett fakið í miðdepilin. Fyrsta Námsvarpið bleiv lagt út í juli, og í skrivandi stund hava vit sjey sendingar tøkar á heimasíðuni og ymsum poddvarpspallum.

Á heimasíðuni er bókaverkið um tey fyrstu 40 árini hjá felagnum eisini tøkt sum ljóðbók. Felagið er í dag meira virkið og sjónligt á talgildu miðlunum enn flest onnur feløg, og er tað við til at styrkja okkara samleika.

Tað sama er galdandi fyri tiltøkini hjá áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum og limatiltøk, sum ráðini hjá Pedagogfelagnum hava skipað fyri. Hetta er alt saman tiltøk, sum hava sett okkara fak í brennidepilin.

Pedagogblaðið liggur nú í fastari legu og kemur út fýra ferðir um árið. Tað er sera kostnaðarmikið at senda blaðið út við Posta, men vit kanna aðrar møguleikar fyri útber-



ing, soleiðis at hvør einstakur limur fær eitt pappírseintak av blaðnum fýra ferðir um árið.

## Stuðul til phd-gransking

Føroya Pedagogfelag var við, tá Greta Jiminez vardi sína ph.d-ritgerð um føroyska dagstovnaøkið á Danmarks institut for Pædagogik og Uddannelse, DPU, á Aarhus Universitet í Keypmannahavn. Hetta er fyrsta ph.d-granskingin av sínum slag um føroysk viðurskifti. Pedagogfelagið hevur eisini stuðlað hesa ritgerð. Ritgerðin eigur at hava ávirkan á, hvussu fakøkið mennist frameftir, tí hon setur sjóneykuna á, hvussu dagstovnaøkið er skipað.

Av øðrum granskingarverkætlanum hava vit eisini gjørt av at stuðla ph.d-granskingarverkætlanini hjá Biritu Arge um dygd á føroyskum dagstovnum.

## Arbeiðsumhvørvi

Arbeiðsumhvørvi hevur høga raðfesting í nevndini, og vit vita, at tað er undir trýsti vegna manglandi og skiftandi starvsfólk og áhaldandi royndunum hjá arbeiðsgevarunum at avmarka útreiðslur. Her eru arbeiðstíðarreglur ein týðandi liður í at fáa viðurskiftini upp á pláss. Við greiðum arbeiðstíðarreglum eigur at bera til at skipa soleiðis fyri, at orka og umstøður eru at arbeiða fulla tíð á øllum námsfrøðiligum arbeiðsplássum.

Stytta arbeiðsvikan hevur eisini verið nógv á breddanum, og Pedagogfelagið var eitt av feløgunum aftanfyri umfatandi kanningina av fyrimunum og vansum við at stytta arbeiðsvikuna. Kanningin gav okkum fyrstu tølini, ið lýstu veruliga kostnaðin av at stytta arbeiðsvikuna.

## Kunning um umboðan

**Føroya Pedagogfelag er soleiðis umboðað í nevndum, ráðum, stýrum og øðrum:**

Dagstovnaráðið: Edda Hjartvardsdóttir og Nikkil Heinesen

Útbúgvingarráðið fyri námsfrøðishjálparar: Kára Danielsen

Samstarvsráðið fyri námsfrøðingaútúgvingina: Jógvan Philbrow

Umboð í Javnstøðunevndini vegna løntakarar: Jógvan Philbrow

Nevndin í PF Fakfelag (eigur 50 prosent av LÍV): Jógvan Philbrow

Stýrið fyri Nordisk forening for Socialpædagoger (NFFS):
Jógvan Philbrow

Stýrið fyri Nordisk lærerorgainsations samråd (NLS): Jógvan Philbrow

Sektorlimir á dagstovna- og frítíðarskúlaøkinum hjá NLS:
Nikkil Heinesen og Annika Østerø

Altjóða felagsskapurin fyri sosialnámsfrøðingar (AIEJI):
Jógvan Philbrow, aðalskrivari

Vit eru somuleiðis ígjøgnum Fakfelagssamstarvið umboðað í ALS-stýrinum, í nevndini fyri Fasta Gerðarrættin og annað.

Kanningin vísti okkum greitt, at fyrimunirnir eru nógv størri enn vansarnir, og kanningin hevur eisini verið við til at sett styttu arbeiðsvikuna á dagskrá í Løgtinginum.

Kanningin um "Tíð til annað arbeiðið", ið Pedagogfelagið hevur gjørt saman við Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, KAF, bleiv liðug, og álitið vísti á fleiri viðurskifti, serliga arbeiðstíðarviðurskifti, ið skuldu skipast betur enn í dag. Hetta hevur felagið brúkt nógva orku uppá, og arbeiðstíðarviðurskifti er eisini eitt evni, sum vit hava havt við til samráðingarborðið.

Dagstovnaráðið, ið er skipað eftir dagstovnalógini, kom eisini við einum tilmæli. Tað hevur heiti "Fyri barnsins besta", og har verður víst á fleiri viðurskifti, ið eiga at skipast betur enn í dag.

### Limaágóðar

Inni á limaportalinum sæst yvirlit yvir handlar og fyritøkur, ið bjóða limum felagsins avsláttur. Vit arbeiða støðugt við at víðkað um tilboðini. Allir limir felagsins kunnu stovna sær profil á limaportalinum.

Stívliga eitt ár er nú liðið, síðan vit fingu nýggja frítíðarhúsið, og sigast má, at limirnir hava tikið væl ímóti tí. Húsið hevur verið bílagt at kalla øll vikuskifti og serstakar frídagar. Hóast onkrar avbjóðingar hava verið við bókingarskipanini, skuldi hon virka væl í dag. Á jólum var ein vatnskaði staðfestur, og vísir tað

seg, at skaðin er størri enn fyrst hildið. Smáttan hevur tí ikki verið tøk í januar og februar.

Felagið hevur eisini skipað fyri tveimum evniskvøldum við Gretu Jiménez – einum í Smæruni í Havn og einum í Heilsuskúlanum í Suðuroy – har hon greiddi frá síni phd-granskingarverkætlan um føroyska dagstovnaøkið. Eisini skipaði felagið fyri einum evniskvøldið í Heilsuskúlanum í Suðuroy við Bergtóru Høgnadóttir – eftir leisitinum hjá Hjálparfólkaráðnum.

Ráðini hava hvørt í sínum lagi skipað fyri tiltøkum, ið vendu sær til limabólkin hjá tí einstaka ráðnum. Leiðararáðið hevur havt Leiðaradag, Námsfrøðingaráðið evniskvøld og Hjálparfólkaráðið eisini eitt evniskvøld. Øll tiltøkini vóru sera væl vitjað.

Sum nakað nýtt hevur umsitingin í Føroya Pedagogfelag roynt seg við "mobilari skrivstovu", og hava vit undir yvirskriftini "Lønartjekk" vitjað í Suðuroynni, í Vágum, í Norðoyggjum og í Havn.

## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálasamráðingarnar hava serliga merkt hetta seinasta hálva árið, bæði okkara egnu samráðingar, men eisini hava samráðingar hjá øðrum feløgum fylt. Samráðingar, sum – hóast vit eisini fingu lovað eitt lønarlyft – hava verið við til at gera støðuna á arbeiðsmarknaðinum meira torgreidda. Lyftið er tiltrongt og kemur ikki av ongum. Tað er eitt neyðugt stig rætta vegin, hóast tað bert er eitt lítið fet.

Sjálvt um felagið var til reiðar at fara undir samráðingar longu stutt eftir aðalfundin 11. mars í fjør, so byrjaðu veruligu samráðingarnar ikki fyrr enn fyrst í september. Samráðingarnar eru merktar av, at Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar hevur verið í verkfalli. Tað var týðiligt, at tað bleiv bíðað eftir, at sáttmálin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum kom til høldar. Og tá verkfallið var av, vísti tað seg eisini skjótt, at fleiri av hinum feløgunum, ið frammanundan ikki vóru komin á mál við sínum samráðingum, nú kropp á kroppi skrivaðu undir sáttmálar, at síggja til uttan nakað stríð. Mótvegis okkum hevur tónin tó verið øðrvísi, eitt nú hava útrokningar viðvíkjandi fortreytunum fyri lønarlyftinum órógvað støðuna. Nærri frágreiðing um hetta er send limunum í teldu-posti.

Samráðingarnar hava verið tungar og fastlæstar. Eftir okkara tykki eiga fleiri viðurskifti at koma uppá pláss, áðrenn undirskrift verður sett á. Arbeiðsgevarin hevur roynt at brúka lønarlyftið at kroysta okkum at góðtaka teirra samráðingarútspæl.

Vit hava eisini í størri mun enn áður kunnað tykkum limir við telduposti, og tað er serliga gjørt orsakað av tí sjáldsomu samráðingarstøðuni, vit eru í.

Gevið gætur, at tá henda frágreiðingin er skrivað, var í hvussu er ikki komið á mál við samráðingunum.

## Eftirløn og trygging

Fakfeløgini eiga nú helvtina av Føroya Lívstrygging, meðan Ognarfelagið Lív, eigur hina helvtina. Hetta hendi í august 2023, tá restandi triðingurin, sum Føroya Landsstýri átti, varð keyptur. Føroya Pedagogfelag er samánari gjøgnum PF Fak-



felag, har vit eisini hava ein nevndarlim. Endamálið við, at fakfeløgini eiga LÍV, er at tryggja, at tað støðugt verður arbeitt við at lækkað umsitingarkostnaðin og økja avkastið av uppsparingunum. Síðan yvirtøkuna er umsitingarkostnaðurin nógv lækkaður, og gongdin tykist at vera á rættari leið.

Vit hava eisini gjørt nýggja fimm ára avtalu við LÍV um samlagstrygging, har upphæddirnar eru broyttar.

Avtalan við LÍV er broytt soleiðis, at útgjaldið í sambandi við hættisliga sjúku hjá limum og børnum hjá limum undir 18 ár hækkar við 25.000 krónum, úr 125.000 krónum í 150.000 krónur. Harafturat er tryggingin nú galdandi heilt fram til eftirlønaraldur.

Upphæddirnar við deyða eru broyttar soleiðis, at 100.000 krónur eru lagdar afturat í øllum aldursbólkunum. Eisini hendan tryggingin er nú galdandi fram til eftirlønaraldur.

Kostnaðurin fyri tryggingina hækkar eitt vet, úr 155 krónum upp í 169 krónur um mánaðin frá 1. januar 2024 at rokna.

**Lívstrygging:** Við deyða verður útgoldið soleiðis:
Limir, 18-49 ár
700.000 kr
Limir, 50-59 ár
600.000 kr
Limir, 60-fólkapensjónsaldur
500.000 kr

**Ávísar hættisligar sjúkur:** Goldið verður út sambært galdandi tryggingartreytum fyri "ávísar hættisligar sjúkur".
Tryggingarupphædd limir
150.000 kr
Tryggingarupphædd børn
150.000 kr

Møguligt útgjald í sambandi við hættisliga sjúku verður ikki mótroknað í veitingini við deyða.

**Hoyritól:** Um limur fær stuðul játtaðan sambært kunngerð um hoyritól, gevur hetta samstundis rætt til útgjald frá tryggingini. Útgoldið verður sambært játtan um stuðul og rokning frá veitaranum. Tryggingin rindar tað, sum liggur oman fyri játtaða stuðulin, tó í mesta lagið 4.000 krónur fyri hvørt hoyritólið sær.

## Álitisfólk
Í september var álitisfólkaveitsla eftir fundin og skeiðið. Eftir ætlan verður hetta eitt afturvendandi tiltak annað hvørt ár. Hetta hevur verið felagsins háttur at geva eitt sindur aftur til tey, ið hava átikið sær strævna leiklutin sum álitisfólk.

Álitisfólkini eru ein týðandi partur av felagnum, og uttan tey røkkur felagið ikki nóg væl út. Vit eru sera takksom fyri tey, ið átaka sær hesa til tíðir truplu uppgávu.

## Fakfelagssamtarvið
Nógv virksemi hevur verið Í Fakfelagssamstarvinum. Feløgini í Fakfelagssamtarvinum eru Lærarafelagið, Akademikarafelagið, Heilsuhjálparafelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Starvsfelagið og Pedagogfelagið. Talan er um sjey tey størstu fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum, og tilsamans umboða vit umleið 8.000 limir.

Í Fakfelagssamstarvinum er millum annað arbeitt við at fáa ávirkað politisku skipanina til at stytta arbeiðsvikuna og gera tað møguligt at trekkja limagjald til fakfeløg frá í skatti. Í báðum førum er talan um batar, ið skulu gera tað liviligari hjá limum okkara á arbeiðsmarknaðinum. Eitt triðja evni, ið Fakfelagssamstarvið arbeiðir nógv við, er arbeiðsumhvørvi.

Fyri framman er eisini eitt átak at fáa ta sannroynd í brennidepilin, at sáttmálarættindi ikki koma av sær sjálvum, og at tað tí er best, um fólk gerast limir í fakfelag.

## Hoyring
Vit hava verið tikin við til hoyring um vetraferiuna í fólkaskúlanum. Vit vístu á ymisk viðurskifti, har vit sjálvsagt skulu gera tað. At flyta eina viku ávirkar børnini, men tað ávirkar sanniliga eisini frítíðarskúlar og limir okkara, sum starvast í fólkaskúlanum.

Nevnast kann eisini, at vit í størri mun enn áður uppliva at verða tikin við sum hoyringspartur, tá ymisk lógaruppskot ella tilmæli skulu gerast. Eitt nú um harðskap í nærsambondum og kunning um málskúla og annað.

## Altjóða samstarv
Í norðurlendska samstarvinum er eitt nýtt netverk upprættað, har samráðingarleiðarar fyri flest øll pedagog- og lærarafeløg hittast at umrøða felags viðurskifti.

Nikkil og Annika luttóku eisini á evnisdegi í norðurlendska samstarvinum, NLS, har sjóneyka varð sett á, hvussu fólk betur kunnu lokkast til námsfrøðiliga virksiøkið og støðast, so tey verða verandi í størvunum. Hetta er ikki ein trupulleiki, sum bara vit í Føroyum sita við, men ein heimsumfatandi trupulleiki.

Í altjóða felagsskapinum fyri sosialnámsfrøði (AIEJI) hevur nógv fokus verið á "kompetansuprofilin" hjá námsfrøðinginum, og ein altjóða framløga og viðgerð verður seinni í ár. Hesa fáa limirnir eisini innbjóðing til.

Vónandi gevur henda frágreiðingin eitt hampuligt innlit í virksemið hjá nevndini hetta seinasta árið.

# Skráin til aðalfund felagsins 2. mars 2024 á Hotel Føroyum

## Innskriving til aðalfundin byrjar klokkan 08.30

Leiðaráðið, Námsfrøðingaráðið og Hjálparfólkaráðið byrja sínar fundir kl. 10:00 við hesi skrá:
A) Val av fundarstjóra og skrivara
B) Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin
C) Frágreiðing frá ráðnum
D) Framløga av roknskapi og fíggjarstøðu til kunningar
E) Framløga av fíggjarætlan og virksemisætlan til kunningar
F) Viðgerð av innkomnum uppskotum
G) Kunngerð um hvør er valdur í ráðini
H) Ymiskt

Hjá Námsfrøðingaráðnum standa tvey fyri vali. Sigrun Ørvarodd hevur bjóðað seg fram, og verður hon vald uttan atkvøðugreiðslu. Sostatt skal Námsfrøðingaráðið hava ein ráðslim til 1 ár, og tað valið fer fram á fundinum hjá Námsfrøðingaráðnum.

Hjálparfólkaráðið skal hava 4 ráðslimir, 3 fyri 3 ár og ein fyri 2 ár. Ongin hevur bjóðað seg fram, og tí fer valið fram á fundinum hjá Hjálparfólkaráðnum.

Tá ráðsfundirnir eru lidnir er miðmáli frá kl. 11.30-12.30.

Kl. 12.30 byrjar felags aðalfundurin við hesi dagsskrá:
Formaðurin bjóðar vælkomin
Felagssangur
Gestarøðari

## Fundarskráin:

A. Val av fundarstjóra og skrivara
B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin
C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar
D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar
F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins
G. Val av grannskoðarum
H. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi

## Limagjald

At limagjaldið í framtíðini verður max. kr. 400,- um mánaðin.
– Uppskotstillari Ann Poulsen

## Bygnaður felagsins

Fyrimunir vansar við ráðunum – uppskotstillari Ann Poulsen

Hvat heldur nevndin, stendur felagið sterkari við at verða saman, og hvørjir fyrimunir og vansar eru við bygnaðinum sum nú er. – Ynski er at fáa eitt kjak um hetta á aðalfundinum – uppskotstillari Nicodemus Líggjasson

I. Fráboðan um hvør er valdur í nevnd og sum eykalimur
J. Fráboðan um hvør er valdur til formann triðja hvørt ár
K. Ymiskt

Limaportalurin – nøktandi limaágóðar? – uppskotstillari Ann Poulsen

Kunning um uppskot til nevndina, um løn til álitisfólk hjá Almannaverkinum – øll fáa ikki løn tá tey fara á álitisfólkafund – uppskotstillari Gitta av Kák



*Jógvan Philbrow bleiv fyrstu ferð valdur til formann í Pedagogfelagnum á aðalfundinum í 2015 og er síðan afturvaldur tvær ferðir uttan mótvalevni. Nú bjóðar hann seg fram at stjórna felagnum í trý ár afturat*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Valgrein, formansvalið:

# LØN, EFTIRLØN OG ARBEIÐS-UMSTØÐUR ERU AÐALMÁL

Tá undirstøðukervið verður umtalað, verður tað ofta bert umrøtt sum vegir, brýr, berghol, bussar og ferjur – ferðslukervið, ið bindur samfelagið saman reint fysiskt, og hvussu vit koma frá a til b.

Alt ov lítið er hugsað um tað menniskjaliga undirstøðukervið. Tað er menniskjuni, ið eru við til at binda samfelagið saman, tað eru øll tit, ið tryggja, at samfelagshjólini mala. Tað eru tit, sum eru límið í samfelagnum, tit sum arbeiða á námsfrøðiligu virkisøkjunum hjá landi og kommunum.

Góði limur, at vera formaður í Føroya Pedagogfelag er ein heiður. Eg eri takksamur fyri tíðina, eg havi fingið, og vónandi fái eg tykkara stuðul at halda fram trý ár afturat.

Føroya Pedagogfelag er í dag eitt sterkt felag við nógvum limum. At vit eru fleiri í felag, hevur tænt øllum væl, hjálparfólkum eins væl og námsfrøðingum og leiðarum. Flest øll hava havt ein størri lønarvøkstur enn miðal lønarvøksturin á almenna arbeiðsmarknaðinum. Hetta er ein av ágóðunum av at standa saman um felags áhugamál.

## Heldur saman enn sundur

Úrslitini av sáttmálasamráðingunum hava tó ikki verið líka góð hvørja ferð, og øll hava ikki altíð fingið eins nógv burturúr. Tá vit eru fleiri lønarbólkar í sama felag, kann tað gerast meira sjónligt, at samráðingar- og lønarskipanin samanumtikið er skeiklað. Tað er tó ein stórur fyrimunur fyri einstaklingin, at bólkarnir eru í sama í felag. Tí um vit býttu okkum sundur í tvær ella fleiri eindir, so vóru tær hvør í sínum lagi so lítlar, at arbeiðskorini blivu enn minni ella als ikki vird.

Felagið megnar í dag at veita góða ráðgeving og hjálp, og um neyðugt løgfrøðiliga hjálp í starvsrættarligum viðurskiftum. Í so máta hanga stødd og styrki neyvt saman.

Ítøkiliga kann eg nevna stóra málið um yvirtíð í Almannaverkinum. Eitt mál, har arbeiðsgevarin als ikki helt seg skylda okkara limum nakra løn. Men vit vunnu málið, og dómurin hevur merkt, at seinastu tvey árini er meira enn hálv onnur millión krónur útgoldin fyri arbeiddar tímar, sum ikki vóru løntir, og Almannaverkið hevur eisini broytt sína mannagongd soleiðis, at fleiri nú uttan stórt stríð fáa sína yvirtíð útgoldna.

## Lønarlagið er batnað

Hyggja vit at sáttmálunum, eru eisini batar hendir har. Ikki minst er lønarlagið batnað, hóast vit verri

enn so eru komin á mál. Vit síggja, at mótstøðan er stór, tá ið veruligir batar skulu gerast. Tó bendir okkurt á, at politiska skipanin so smátt er farin at skilja, at munagóð átøk mugu gerast.

Onkur heldur kanska, at níggju ár er ríkiliga leingi at sita sum forfólk í Pedagogfelagnum. Men eg havi enn brennandi ynski og mál, sum eg fegin vil røkka, limunum og námsfrøðini at gagni, og tí biði eg um tykkara mandat í enn eitt trý ára skeið.

Løn, eftirløn og arbeiðsumstøður eru aðalmál hjá mær at fáa bøtt um. Vit flyta okkum miðvíst fram á leið. Fetini eru smá, og tað gongur als ikki so skjótt, sum eg vil, men tað gongur framá og ikki afturá.

Tað er nógv hent hesi skjótt níggju árini, eg havi verið formaður. Dagstovnaøkið hevur verið og er í einum stórum aldudali við stórum starvsfólkatroti. Miðstaðarøkið er serliga hart rakt, men trotið er tó generelt. Sama hvussu góðar skipanir annars eru, so slepst ikki undan, at starvsfólkatrot merkir økt trýst á tey starvsfólkini, sum eru, og økta trýstið elvir til strongd. Her er nógv at taka hond um, og júst tá soleiðis leikar á, hava raktu limirnir brúk fyri einum sterkum felag í rygginum.

Almannaverkið hevur aftur framt stórar bygnaðarbroytingar, hesa ferð við tí fyri eyga at fáa meira nærleiðslu og fara burtur aftur frá fjarðleiðslu.

## Myndugleikar vakna

Trotið á námsfrøðingum er nú vorðið so eyðsýnt, at tað ber ikki til at tosa seg burtur úr tí longur. Landið roynir nú at økja upptøkuna av námsfrøðilesandi á Fróðskaparsetrinum, og Tórshavnar Kommuna er farin at bjóða sínum hjálparfólkum at taka námsfrøðiútbúgvingina sum merittútbúgving á donskum lærustovni. Tað mesta verður gjørt á netinum og við síðuna av arbeiðnum. Júst hesum møguleikanum hava vit í Pedagogfelagnum sóknast eftir, alt tað eg minnist, men eg hevði tó ynskt, at ein sovorðin útbúgving bleiv boðin út saman við Fróðskaparsetrinum.

Á dagstovnaøkinum er støðan í fleiri kommunum endavend samanborið við fyri nøkrum árum síðan. Tá var ofta tepurt við játtanum til starvsfólk á dagstovnaøkinum, men nú eru tað starvsfólkini, sum mangla, meðan peningurin fleiristaðni ikki er nakar trupulleiki. Og har, sum tað fyrr varð sagt, at ráð vóru ikki til fyrireikingartíð og eftirmetingartíð, har eru fleiri kommunur blivnar gávumildar við fyrireikingartíðini, sum verður brúkt í kappingini um starvsfólkini.

## Tíðin búgvin at eftirmeta

Nógv er broytt í samfelagnum, og tað er tað eisini hjá Pedagogfelagnum. Vit hava skipað felagið við nýggjum bygnaði. Ein bygnaður, ið leggur upp til, at ymisku áhugamálini í felagnum fáa betur rúm og umstøður, tað veri seg hjá hjálparfólkum, námsfrøðingum og leiðarum, umframt at møguleiki er at skipa seg í áhugabólkar. Um ein ynskir at fáa ávirkan, so ber hetta betur til nú, og tað var eisini meiningin við bygnaðarbroytingunum.

Bygnaðarbroytingarnar blivu framdar í 2019, og vit fingu Hjáparfólka-



*– Løn, eftirløn og arbeiðsumstøður eru aðalmál hjá mær at fáa bøtt um. Vit flyta okkum miðvíst fram á leið. Fetini eru smá, og tað gongur als ikki so skjótt, sum eg vil, men tað gongur tó framá og ikki afturá*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

ráðið, Námsfrøðingaráðið og Leiðararáðið. Skipanin hevur nú fimm ár á baki, og tíðin er búgvin at eftirmeta hana og kanna eftir, um hon virkar soleiðis, sum vónað og ætlað var. Eftir at sáttmálasamráðingarnar einaferð eru lidnar, mugu vit fara í gongd við eftirmetingina.

Høvuðsmálið er, at øll skulu kunna kenna seg heima í felagnum, og at fleiri fáa ávirkan. Eg ivist ikki í, at felagið stendur sterkast, tess fleiri vit eru, og tess fleiri eru virkin, men tað er eyðsæð, at eitt stórt felag, sum er samansett av bólkum, ið ikki altíð hava somu áhugamál, eisini hevur kompleksar avbjóðingar.

## Nógvar avbjóðingar

Avbjóðingarnar eru nógvar og stórar næstu árini. Ein hin størsta er, at arbeiðsgevararnir krevja alsamt meira av starvsfólkunum. Ynski eru allatíðina um smidleika, sum í fyrsta lagi gagna arbeiðsgevarunum og fíggjarstøðuni á arbeiðsplássinum.

Framtíðin krevur, at vit skulu øll verða á arbeiðsmarknaðinum sum longst. Og fyri at hetta skal bera til,

mugu vit tryggja haldgóðar skipanir og eitt gott arbeiðsumhvørvi, soleiðis, at vit eisini fara at orka at arbeiða longri.

Kanningin, ið felagið gjørdi saman við Kommunala arbeiðsgevarafelagnum í fjør, vísti á fleiri viðurskifti, ið skulu bøtast – her er enn nógv at arbeiða við, millum annað at marka tíð til fyrireiking og eftirmeting.

## Virðingin veksur

Eg síggi eisini glottar. Eitt nú haldi eg, at virðingin fyri fakinum í roynd og veru veksur. Tað er vorðið longri ímillum háandi røddirnar, ið halda, at námsfrøðin er óneyðug. Hugburðurin hjá politisku skipanini tykist tó framvegis vera, at ein tænasta SKAL veitast, men góðskan kemur í aðru røð. Hetta er galdandi bæði á kommunala økinum, í fólkaskúlunum og á stovnunum hjá landinum. Broytingar hómast, og vit hoyra støðugt fleiri foreldur og avvarandi vísa á tørvin á góðskugóðum tilboðum. Hetta kemst ikki av ongum, men er eitt úrslit av, at vit í dag eru vorðin ein sjónligari partur av samfelagnum.

## Miðling og profilering

Vit hava eisini økt um fakligu miðlingina við millum annað evniskvøldum, við at ráðini skipa síni egnu fakligu tiltøk, við Námsvarpinum, og við at Pedagogblaðið nú verður útgivið fýra ferðir um árið. Alt hetta er við til at styrkja fakið, gera tað sjónligari í samfelagnum og samstundis skerpa profileringina av sjálvum felagnum.

Sum formaður krevur tað eisini dirvi at standa fast, tá bólkar verða settir upp ímóti hvørjum øðrum. Her hugsi eg til dømis um námsfrøðingar móti hjálparfólkum, starvsfólk hjá Almannaverkinum móti starvsfólkum á dagstovnaøkinum, leiðarar versus starvsfólk, tænastumenn ímóti ikki tænastumannasettum, og so framvegis.

Men tá eins egnu umstøður ikki eru nóg góðar, er ofta lættast at finna orsøkina aðrastaðni, heldur enn at hyggja inneftir at vita, um ein sjálvur kanska kann gera okkurt fyri at styrkja sítt egna fakøki. Ofta er orsøkin til illstøður so einføld.

## Samhanhald og samstarv

Ein avgerandi fortreyt fyri, at alt skal kunna ganga væl og konfliktir loftast og loysast, er hon, at allir limir standa saman um og stuðla sítt fakfelag.

Felagið fevnir um eitt breitt og fjøltáttað virkisøki, og tað fara altíð at vera umstøður og viðurskifti, sum lættliga kunnu seta kílar í og elva til ósemjur. Tað kann bæði vera innanhýsis og við onnur fakfeløg. Besti mátin at fyribyrgja sovorðnar ósemjur er samstarv. Og tí er tað ikki av ongum, at vit eru ein virkin partur av Fakfelagssamtarvinum, og framtíðin krevur enn fleiri og tættari samstørv, innanhýsis eins væl og við onnur fakfeløg.

Hesar hugsanir hava seinastu níggju árini verið drívmegin hjá mær í royndini at broyta hugburðin í samfelagnum til frama fyri okkum og fyri okkara fakfelag.

Enn eri eg ikki komin á mál, og mær tørvar tín stuðul, so at eg kann halda fram.

***Takk fyri.***



*Sanna á Løgmansbø, námsfrøðingur, er leiðari á dagstovninum Birkilund í Havn. Nú bjóðar hon Jógvani Philbrow av um forfólkasessin í Pedagogfelagnum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

**Valgrein, formansvalið, Sanna á Løgmansbø skrivar:**

# PEDAGOGFELAGIÐ TREINGIR TIL NÝGGJAN HAM

Eg var á einum sera áhugaverdum SSP-degi herfyri, har Djóni N. Joensen, landsstýrismaður, í setanarrøðu síni segði nakað soleiðis: "Ætlar tú at ganga skjótt, skalt tú ganga einsamallur. Ætlar tú at ganga langt, skalt tú ganga saman við øðrum". Orðini raktu meg, og settu tankar í gongd, tí dagin fyri hevði eg váttað, at eg vildi stilla upp sum forfólk fyri Føroya Pedagogfelag og sostatt ganga á odda, øllum mínum starvsfeløgum kring landið at frama.

Vanliga gangi eg rættiliga skjótt, tí eg eri virkisfús og djørv, og hjá mær er stutt frá orði til gerð, tá eg veit, at okkurt eigur at verða gjørt betri og øðrvísi.

Hetta er uttan iva ein av mínum styrkjum, men eg eri tilvitað um, at styrki skjótt kann blíva ein veikleiki, um tú ikki ert umhugsin og tekur atlit at bráa lyndinum. Øvugt kann ein veikleiki ofta eisini vendast, og blíva tín styrki, um tú dugir at hava fyrilit.

Í skónum hjá einum góðum forfólki hugsi eg, at tað er neyðugt at duga bæði – viðhvørt er neyðugt at ganga skjótt, tí tú mást bera skjótt at, men ofta skalt tú eisini lata onnur seta ferðina, og fylgja við. At vita nær tú gert hvat og at duga at tillaga seg um neyðugt, er ein sera týðandi førleiki fyri eitt komandi forfólk.

Eg eri tilvitað, og eg veit, at mín styrki í at vera djørv og at tora at ganga á odda er ein neyðugur førleiki, sum krevst í einum slíkum starvi. Eg dugi væl at ganga skjótt, og eg kann og vil ganga langt. Og fyri meg er tað eyðsýnt, at skal Føroya Pedagogfelag ganga langt, so er tað nú í tøkum tíma, at vit fara til gongu – saman! Tí fyri mær tykist tað veruliga, sum vit hava staðið í sama stað í eitt mannaminni.

## Námsfrøðin er fánað

Rákið á námsfrøðiliga økinum hevur seinastu árini borið brá av, at námsfrøðin er fánað; fólk tykjast mótfallin, arbeiðsbyrðan er blivin alsamt tyngri, og politiski mynduleikin tykist ikki heilt skilja álvaran í tí, sum er við at henda.

Tó, nú er onkur vaknaður við kaldan dreym; ein roynd at seta meritt-útbúgving í gongd er gjørd, men vit vita, at hetta fer at taka tíð, og fer bara at loysa ein brotpart av stóru avbjóðingini, ið hóttir okkara arbeiðsøki.

Vit mangla starvsfólk – og av enn størri týdningi: Vit mangla fakfólk!

Hóast vit hava gjørt vart við, at ein onnur – og kanska nógv meira effektiv loysn eisini finst – altso, at geva eina lønarhækking, ið bara sømir seg, so vil politiski myndugleikin ikki hoyra talan um hetta. Tað er, sum um politiski myndugleikin billar sær inn, at tað ber til at fáa eitt træ at vaksa bara við at seta fræið niður, og annars onki gera, sum til dømis at væta moldina, tá turkur er. Nei, boðskapurin, sum eg tulki hann, er, at nú hevur tú fingið plássið og moldina, so nú skalt tú ikki verða so krevjandi, tí vatnið skulu vit brúka aðrastaðni!

## Ring samvitska og strongd

Í mínum yrki sum dagstovnaleiðari síggi eg dagliga, hvussu manglandi fíggjarlig orka og manglandi fakligheit hevur við sær mistrivnað millum starvsfólkini – OG børnini, ella borgararnar, ið vit varða av.

Taka vit dagstovnaøkið sum dømi, so vita vit, at ein stórur partur av námsfrøðingunum, sum annars hava júst dagstovnanámsfrøði sum sítt fremsta fakliga áhugamál, hava leitað sær aðrar leiðir, tí arbeiðsbyrðan er blivin teimum ov tung.

Alsamt fleiri børn krevja nakað út um tað vanliga, men tá peningur ikki er til at skapa góðar karmar, so hoknar námsfrøðingurin undan. Tí ring samvitska av ikki at røkka tað, ein vil ella skal, ella av, at barnið ikki fær tað, tí tørvar ella hevur rætt til, elvir til strongd og mista arbeiðsgleði. Námsfrøðingurin ynskir at gera eitt dygdargott arbeiði, og dygd kostar. Vit mugu og skulu hava betri løn, tí tað er tað, sum í seinasta

enda fer at gagna barninum og borgaranum.

Góður trivnaður krevur góðar námsfrøðiligar karmar at virka í – góðir námsfrøðiligir karmar krevja fakligheit, og fakligheit kostar! Vit vita, at eitt nú fyribyrging er sera umráðandi, og at fyribyrging merkir minni útreiðslur til viðgerð, sum frá líður. Og hóast vit vita hetta, og at tað er prógvað við gransking og óteljandi kanningum, so vil politiski mynduleikin ikki í nóg stóran mun virka í samsvari við henda veruleikan.

## Lurtar ongin?

Eg undrist ofta, tí hvussu ber tað til, at einki hendir? Hvussu ber tað til, at tey ikki hoyra okkum? Lurta tey ikki? Ella hoyra tey ikki okkara orð? Skulu vit kanska fara at siga og gera okkurt heilt øðrvísi enn tað, vit gera og hava gjørt higartil? Býttleiki er at gera tað sama umaftur og umaftur, men vænta eitt annað úrslit. Er tað tí støðuni, vit eru í?

Soleiðis sum eg síggi tað, so er tíðin komin, at vit venda øllum upp og niður, og byrja at leggja nýggjar og øðrvísi strategiir. Føroya Pedagogfelag treingir til nýggjan ham. Eg ynski at broyta søguna og at skapa nýggja søgu. Eg ynski at laða ein varða, sum skal vísa veg inn í framtíðina.



*– Fyri meg er tað eyðsýnt, at skal Føroya Pedagogfelag ganga langt, so er tað nú í tøkum tíma, at vit fara til gongu – saman! Tí fyri mær tykist tað veruliga, sum vit hava staðið í sama stað í eitt mannaminni, sigur Sanna á Løgmansbø. Myndin er tikin á einum tiltaki í heyst hjá áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Námsfrøðingar skulu standa fram sum ein errin fakbólkur, ið hevur vitan og kunnleika, sum okkara samfelag tørvar! Vit skulu vera tilvitað um, hvar okkara fakligheit røkkur, og hvar hon ikki røkkur, og vit skulu taka upp samstarv við aðrar fakbólkar, har tað er neyðugt. Okkara størsta styrki liggur í at vita, hvar okkara mørk eru. Tí tá vit viðurkenna okkara avmarkingar og leggja orku í tað, sum vit duga, so veksur virðingin fyri okkara serligu førleikum munandi.

Sum eitt nýmótans og proaktivt felag skulu vit arbeiða fyri, at allir limir felagsins kenna seg aftur í tí, vit umboða.

## Ikki antin-ella

Námsfrøðingar skulu hava eitt aktivt og virkið felag at spegla sær í; vit skulu útstrála dirvi, vit skulu stuðla hvør øðrum, eisini tvørtur um fakøki – tað verið seg dagstovnaøkið, serøkið ella forskúla/skúlaøkið og annað. Alt ov ofta verða tingini sett upp sum ein spurningur um antin-ella – antin serøkið ella dagstovnaøkið. Hetta er ikki rætt og er ikki fremjandi fyri okkara samleika úteftir.

Vit skulu vera samhaldsføst og standa saman, sama um tað snýr seg um lønarsamráðingar, sáttmálabroytingar ella okkurt triðja, tí bara soleiðis koma vit á mál.

Vit skulu tosa námsfrøðina fram og blása lív í konstruktivt námsfrøðiligt kjak.

Vit skulu vera proaktiv og arbeiða miðvíst í friðartíð – vit skulu siga frá, spyrja nærri og gera vart við viðurskifti, sum ávirka lívið hjá børnum og ungum, ella hjá teimum, ið ikki hava somu fortreytir at megna egið lív, eins og eg og tú.

Vit skulu vísa á barnarættindi og mannarættindi og syrgja fyri, at eingin borgari er fyri vanbýti. Vit eru ambassadørar fyri einum góðum og tryggum stovnslívi, og fyri trivnaði og menning, soleiðis at øll hava góð kor at vaksa upp í.

## Verja vunnin rættindi

Vit skulu krevja okkara rætt, og áhaldandi arbeiða fyri at vinna inn aftur mist rættindi – sama um tað snýr seg um løn ella sáttmálar. Vit skulu ongantíð ganga uppá kompromis viðvíkjandi vunnum rættindum; vit geva ikki aftur nakað, sum vit hava vunnið – vit mugu ikki góðtaka at skulu fara eftir hæli á onkrum øki fyri at fáa okkurt annað á onkrum øðrum øki ístaðin.

Latið námsfrøðina tala, so koma vit eitt stórt stig fram á leiðini.

Verði eg forkvinna í Føroya pedagogfelag, so er hurðin í Tungugøtu 1 altíð opin.

Eg vil vita, hvat tú situr við. Eg vil hava innlit í tær avbjóðingar, sum tú hevur. Eg eri forvitin at hoyra, hvat tú heldur, at vit eiga at taka upp. Og eg fari ikki bara at lurta, eg fari eisini til verka. Orð eru einki uttan gerðir, og saman kunnu vit leggja eina ætlan fyri framtíðina.



*Sunrid Vatnsdal Johannesen er forkvinna í Hjálparfólkaráðnum. Hon stillar ikki uppaftur, og ongin av hinum trimum ráðslimunum, sum standa fyri vali, hevði boðað frá uppstilling, áðrenn freistin var úti*

### Onki valevni til Hálparfólkaráðið

Ongin hevur stillað upp til fýra tómar sessir í Hjálparfólkaráðnum. Bara ein ráðslimur er eftir, men tað ber til at velja tiltakslimir á aðalfundinum, og fráfarandi forkvinnan vónar, at tað fer at eydnast at fáa valt limir í ráðið upp á tann mátan.

# Frágreiðing frá Hjálparfólkaráðnum

Vit hava ikki havt so nógv á skránni síðan seinasta aðalfund. Tó høvdu vit eitt sera væl eydnað tiltak í hugnaliga skótahúsinum við Løkin í Runavík í november.

Nógv fólk møttu upp úr øllum meginøkinum. Bergtóra Høgnadóttir hevði ein sera góðan og viðkomandi fyrilestur, undir heitinum, “At brenna fyri, uttan at brenna út”, har hon legði dent á týdningin av at minnast til at ansa eftir okkum sjálvum, so vit ikki brenna út.

Vit halda, at hjálparfólkini vóru væl nøgd við tiltakið.

Fýra av ráðslimunum standa fyri vali – tað eru øll uttan Annelise Davidsen.

Ongin av teimum, sum standa fyri vali, hevur boðað frá uppstilling aftur, men vónin er, at tað á aðalfundinum vera fleiri, sum brenna fyri korunum hjá hjálparfólkunum, og sum hava hug at bjóða seg fram til tøku sessirnar í ráðnum.

# Ráðsaðalfundirnir eiga at flytast

**Aðalfundurin eigur at snúgva seg um arbeiðið hjá felagnum og tess nevnd, men tíðin til tað verður avmarkað av aðalfundunum hjá teimum trimum ráðunum. Tí áttu teir at verið hildnir ein annan dag, halda tey í Leiðararáðnum. Tey eru tó avgjørd um, at Leiðararáðið eigur at varðveitast og eisini fáa størri vald**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Á aðalfundinum hjá Pedagogfelagnum í fjør vóru tað fleiri, sum fýltust á, at tað bleiv ov lítil tíð til kjak, tí so lítið var út at geva í skránni. Ávís ónøgd var um, at kjakini á aðalfundunum hjá teimum trimum ráðunum máttu brótast av, tí tann stóri felagsaðalfundurin skuldi byrja til tíðina.

Í Leiðararáðnum halda tey eisini, at tíðarætlanin bleiv ov stramm, men samstundis halda tey, at tað í størri mun var tann stóri aðalfundurin og kjakið har, sum var við sviðusoð enn aðalfundirnir hjá ráðunum.

– Tað er spell, tí ráðini hava kortini sum oftast mugað hildið eykaaðalfundir at fáa valt nóg mikið av ráðslimum, og tá hava tey kunnað kjakast, sum teimum lystir, og teir fundirnir hava allir verið stak góðir og ríkir upp á fakligt innihald. Tann møguleikan at fáa fokus á og kjak um sítt arbeiði hevur nevndin í Pedagogfelagnum ikki.

– Aðalfundurin eigur at snúgva seg um alt felagið og um arbeiðið hjá nevndini. Tað er tann dagin, vit øll eru savnað, og vit eiga at fara inn saman og út saman. Tí halda vit eisini, at aðalfundirnir hjá ráðunum skuldu verið hildnir ein annan dag, sigur Mirjam Johannesen, forkvinna, vegna eitt samt Leiðararáð.



*Mirjam Johannesen er forkvinna í Leiðararáðnum, har fýra valevni eru til tríggjar sessir. Teir tríggir ráðslimirnir, sum standa fyri vali, stilla allir uppaftur. Tey eru Mirjam Johannesen, Turið Horn og Elisabeth Henriksen. Afturat teimum hevur Elin N. W. Tausen boðað frá uppstilling*

### Meira vald

Tey halda tó, at Leiðararáðið eigur at varðveitast:

– Teir tríggir bólkarnir, sum tey trý ráðini umboða, hava allir avgjørt brúk fyri onkrum forum til hvør í sínum lagi at kunna viðgera og kjakast um serlig áhugamál. Fyri okkara viðkomandi, so kunnu vit vera ein styrkur hjá nevndini, tí vit vita, hvat rørir seg á leiðsluøkinum.

– Leiðararáðið eigur avgjørt at halda fram og helst í broyttum líki, har tað fær meira vald, tí sum støðan er nú, hava vit onki vald í felagnum.

---

# FRÁGREIÐING FRÁ LEIÐARARÁÐNUM

Á eykaaðalfundinum í mai 2023, sum var hildin í Smæruni í Havn, var danski leiðsluráðgevin og rithøvundurin Elsebeth Hauge gestarøðari. Evnið var "leiðaraskomm", sum hon við støði í samrøðum við nógvar leiðarar á privatum og almennum arbeiðsplássum eisini hevur skrivað bók um.

Á eykaaðalfundinum blivu Arna Silvurstein og Eyð Skúvadal Johannesen nývaldar í Leiðararáðið, og Diana S. Mouritsen bleiv vald sum eykaumboð. Hini eru Mirjam Johannesen, Elisabeth Henriksen og Turið Horn.

Leiðarráðið skipaði seg soleiðis:

Mirjam Johannesen forkvinna, Turið Horn næstforkvinna, Elisabeth Henriksen skrivari, Eyð S. Johannesen, kassameistari og Arna Silvurstein, nevndarlimur.

Leiðararáðið hevur verið saman nakrar ferðir og umrøtt støðuna á okkara økjum, millum annað hittust vit við nevndina og tosaðu um hetta við, at Almannaverkið broytti leiðsluleistin við at minka um talið á eindarleiðarum.

Vit hava eisini í ráðnum umrøtt lønarlyftið, og hvussu vit skulu skilja hetta . Vit kunnu í hvussu er staðfesta, at politiski mynduleikin nú hevur staðfest, at vit eru afturúrsigld lønarmessiga. At hesin parturin um ikki annað er alment staðfestur er at gleðast um.

Vit hava eisini hitt nevnd felagsins fyri at hoyra, hvussu tey tilrættisleggja sáttmálasamráðingarnar.

Árligi landsleiðaradagurin hjá Leiðararáðnum varð hildin 3. november 2023 á Hotel Hafnia við evninum “Rekruttering og fasthaldan av starvsfólkum á námsfrøðiliga økinum”.

Danski fyrilestrahaldarin Helle Hein tosaði um “Leiðslu av primadonnaum”, og Súsanna Olsen hugleiddi um evnið “Rekruttering og nýggjar tíðir”.

Hetta var ein sera væl eydnaður dagur, har vit vóru okkurt um 100 eindarleiðarar, leiðarar og varaleiðarar, so tað var heilt fantastiskt.

Eitt fokus hjá okkum í Leiðararáðnum er at verða meira sjónlig, og vit eru áhugað í at kanna, hvussu til dømis Socialpædagogernes Landsforening (SL) arbeiðir fyri at røkka út til allar sínar limir.

Í tí sambandi hava vit sett okkum í samband við Benny Andersen, formann í SL, fyri at hoyra, hvussu tey í Danmark hava valt at etablera seg, tá tað um leiðaranetverk ræður. Vit ynskja at hoyra meira um, hvussu SL brúkar leiðararnar, tá tað snýr seg um fakligheit, poltitiska strategi og annað. Hesin fundurin verður nú um miðjan februar.

Turið Horn, Elisabeth Henriksen og Mirjam Johannesen, standa fyri valið í ár, og stilla vit allar tríggjar uppaftur.

Valið verður digitalt, og úrslitið verður almannakunngjørt á aðafundinum.

# Tað skal vera tíð til kjak

**Tað hevði helst tænt øllum best, um aðalfundirnir hjá teimum trimum ráðunum ikki vórðu hildnir sama dag sum aðalfundurin hjá sjálvum Pedagogfelagnum, tí eftir verandi leisti er ov lítil tíð til kjak, heldur Krista Hvannastein, forkvinna í Námsfrøðingaráðnum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tey trý ráðini hjá Pedagogfelagnum skulu eftirmetast í næstum og verða eisini viðgjørdá aðalfundinum, og har eru avgjørt viðurskifti, ið eiga at endurskoðast, heldur Krista Hvannastein, forkvinna í Námsfrøðingaráðnum. Hon ivast eitt nú í, um tað er so skilagott at skunda aðalfundirnar hjá ráðunum ígjøgnum áðrenn aðalfundin hjá sjálvum felagnum.

– Samanumtikið haldi eg, at námsfrøðingar eru glaðir fyri, at vit hava hetta ráðið, har tað ber til at nørdast við námsfrøðini, so eg haldi avgjørt, at ráðið skal halda fram. Men har fyri riggar alt ikki líka væl. Í verandi skipan hava tey trý ráðini sínar aðalfundir beint áðrenn stóra aðalfundin hjá felagnum, og tá sigur tað seg næstan sjálvt, at klokkan verður rættiliga stýrandi.

– Nú lá eg veðurføst á Sandi og slapp ikki á aðalfundin í fjør, men eg veit, at tað tá bleiv funnist at, at tað var alt ov lítil tíð til kjak – bæði á aðalfundunum hjá ráðunum og á



*Krista Hvannastein er forkvinna í Námsfrøðingaráðnum, sum ikki er fullmannað. Hon vónar, at tað fer at eydnast at fáa valt fólk í tómu ráðssessirnar á aðalfundinum hjá ráðnum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

felags aðalfundinum. Í Námsfrøðingaráðnum mátti kjakið bara kubbast av, tá tann stóri aðalfundurin skuldi byrja. Tað er spell, tí meiningin við ráðunum er júst tann at fáa meira tíð og rúm til fakligt kjak, sigur hon.

## Aðalfund hvør sær

Krista Hvannastein leggur dent á, at hon úttalar seg fyri egna rokning um hesi viðurskiftini og ikki vegna ráðið.

– Men sjálv haldi eg, at tað besta hevði verið, at ráðini ikki høvdu aðalfund samstundis sum Pedagogfelagið. Tí tað má og skal vera tíð til kjak. Nú hava vit nakrar ferðir verið í tí støðu, at vit hava noyðst at havt eykaaðalfund fyri at fáa ráðið fullmannað. Vit hava hvørja ferð kombinerað eykaaðalfundin við okkurt serligt tiltak. Tað hevur riggað ógvuliga væl, og undirtøkan hevur verið stór. Tí vænti eg ikki, at tað verður nakar trupulleiki at fáa fólk at møta á aðalfundi í Námsfrøðingaráðnum, sjálvt um hann ikki er sama dag sum aðalfundurin hjá felagnum, sigur hon.

Krista Hvannastein, Dagny Miðskarð, Unn Jarnskor Ellingsgaard og Sigrun Ørvarodd mynda Námsfrøðingaráðið í løtuni. Fyrst Katrin Eysturdal og síðan Anja Haldansen søgdu sínar ráðssessir frá sær í fjør. Sigrun Ørvarodd, sum var varalimur, tók við, tá Katrin fór, og Sigrun hevur eisini boðað frá uppstilling til ráðið. Tað merkir, at hon longu er vald, men at tað framvegis vantar ein limur í, at ráðið er fullmannað. Til ber tó nú at velja tiltakslimir beinleiðis á aðalfundunum hjá ráðunum og felagnum.

# FRÁGREIÐING FRÁ NÁMSFRØÐINGARÁÐNUM

Eftir aðalfundin 11. mars í fjør stóðu vit í tí støðu, at ráðið ikki var fullmannað, og tí máttu vit beinanvegin undir at fyrireika ein eykaðalfund.

Tá vit fyrireika tiltøk, leggja vit okkum eftir at koma runt um landið, og eykaaðalfundurin varð hildin á Fiskastykkinum í Sandavági 27. apríl. Undirtøkan var góð, ráðið hevði fyrireikað nakrar spurniningar, sum løgdu upp til kjak. Kjakið gekk dúgliga, og vit løgdu veruliga til merkis, at námsfrøðingar hava tørv á ein góðum kjakforum.

Vit fingu mannað ráðið, enntá eisini við tiltakslimi, so tað var sera gleðiligt. Vit skipaðu okkum áðrenn summarfrítíðina og løgdu eina ætlan fyri einum tiltaki um relasjónir at hava um heystið.

Evniskvøldið um relasjónir við Jóhannes Miðskarð var so 27. september í frítíðarskúlanum Snjalljubjallu í Klaksvík, og undirtøkan var stór. Fólk lótu sera væl at tiltakinum, og ein grein í Pedagogblaðnum spurdist eisini burturúr.

Tíverri eru vit aftur komin í ta støðu, at vit ikki eru fullmannað.

Vit mugu ásannað, at hetta ráðið er eitt livandi organ, at hetta arbeiðið skal gerast afturat okkara vanliga námsfrøðiliga arbeiði, og tað kunnu henda broytingar í lívinum, sum gera tað torført at hanga í.

Vit mangla tveir limir, men tíbetur stillar tiltakslimurin, sum tók við, tá tað minkaði burtur av føstu ráðsmanningini í summar, upp. Vit vóna at fleiri námsfrøðingar bjóða seg fram á aðalfundinum at taka eitt tak í Námsfrøðingaráðnum, har vit hava møguleikar at skapa eitt forum at koma saman um okkara námfrøðiliga arbeiði.

### Valgrein, nevndin, Katrin Helgadóttir:

# UMBOÐAN OG ÁVIRKAN ERU LYKLAORÐINI

Starvsfólkatrot, manglandi námsfrøðingar og lág løn eru nøkur viðurskifti, ið ávirka námsfrøðiliga arbeiðsøkið. Hetta er ein partur av veruleikanum á okkara starvsøki. Hin parturin er relatiónsarbeiðið, kontaktin og menningararbeiðið við børnum, ungum, vaksnum og eldru borgarunum. Hesin jaligi parturin av okkara veruleika kemur sjáldan fram í miðlunum, og hevur lyndi til at verða gloymdur í kjakinum um neiliga partin av okkara veruleika. Fyri meg eru umboðan og ávirkan tvey týdningarmikil hugtøk í mínum dagliga starvi, og tey ætli eg at taka við mær inn í nevndina í Føroya Pedagogfelag, um eg verði vald.

Eg eiti Katrin Helgadóttir, eg fekk prógv sum námsfrøðingur í 2016, og havi áðrenn tað tikið bachelorprógv í sosiologi í Onglandi og masterprógv í mannarættindum í Avstralia. Í mínum arbeiði uttanlands, havi eg millum annað verið knýtt at Reyða Krossi sum vitjanarvinur, arbeitt við upprunabørnum í frítíðarskúla í Avstralia og við flóttafamiljum í barnagarði í Danmark. Eg flutti aftur til Føroyar í 2016, eftir 11 ár uttanlands, saman við franska manni mínum og okkara tveimum synum. Í Føroyum, havi eg millum annað starvast innan barnaverndar- og frítíðarskúlaøkið. Tey seinastu fýra árini havi eg starvast sum dagstovnaleiðari í Tórshavnar Kommunu.

## Umboðan

**Limir**

Á sama hátt sum tit hvønn dag umboða børn og borgarar í tykkara starvi, skulu vit sum nevnd umboða tykkum, tykkara áhugamál og – ikki minst tykkara fakligheit. Eftir mínum tykki er umboðan alneyðug í einum fakfelag. Hetta er nakað, ið eg fari at leggja meg eftir og tryggja, at limir kring alt landið og innan øll øki verða hoyrdir og umboðaðir. Fyri at hetta kann fremjast, so er neyðugt við aktivum limum, ið ynskja at taka lut.

**Fakið**

Eitt av endamálunum við felagnum er "...at virka fyri størri kunnleika og fatan fyri námsfrøðiliga arbeiðinum". Hetta er ein umráðandi partur av nevndararbeiðinum. Vit hoyra næstan dagliga politikarar og onnur umrøða dagstovnar at vera "ansingarstovnar", tá teir í veruleikanum eru "menningarstovnar". Hetta hendir óivað, tí at samfelagið ikki skilir týdningin av námsfrøðini. Tí má nevndin, saman við limunum, vera við til at lýsa og sjónliggera fakið. Í felag mugu vit millum annað trýsta politikarar til at arbeiða aktivt við, at okkara fak fær umboð-



*Katrin Helgadóttir, dagstovnaleiðari, stillar upp til nevndina*

## Fimm valevni til nevndina

Tað eru fimm valevni til tríggjar nevndarsessir hesa ferð. Upprunaliga vóru tey seks, men

beint fyri evstamark hjá Pedagogblaðnum hevði Dagnhild Magnussen Bertelsen tikið sína uppstilling aftur. Valevnini eru hesi:

- Beinta Klakstein
- Harald Joensen
- Katrin Helgadóttir
- Nikkil Heinesen
- Sæbjørn Johannesen

Valgreinarnar hjá teimum fimm valevnunum kunnu lesast á hesi og næstu síðunum.

an í almennu ráðunum millum annað við starvsfólki, sum kenna kompleksitetin í námsfrøðini.

## Ávirkan

**Námsfrøðilesandi**
Tað eru tey lesandi, sum sita inni við nýggjastu vitanini, og sum koma at taka fatt eftir okkum. Eg ímyndi mær, at tað kemur námsfrøðini til góðar, um samstarvið millum tey lesandi og nevndina verður styrkt, eitt nú við regluligum samskifti millum tey lesandi og nevndina.

**Ráðini**
Eg meti tað vera umráðandi, at ráðini gerast meira sjónlig í felagnum. Við at sjónliggera ráðini, verður tað lættari hjá limum at hava eina ávirkan á felagið. Og fyri at felagið allatíðina skal hava framgongd, er tað neyðugt, at limir gera vart við teirra áhugamál og viðurskifti, ið tey meta vera umráðandi.

**Samráðingar**
Tá samráðingar eru á skrá, er neyðugt við gjøgnumskygni og týðiligum ætlanum og málum. *Í felag fyri teg* má ikki bert vera nøkur tóm slagorð, hesi orð mugu fremjast í verki. Eg vil arbeiða fyri, at limir sleppa til orðanna og seta orð á, hvat mann ynskir, at nevndin fer til samráðingar við (væl vitandi, at tað ikki er gjørligt at ganga øllum ynskjum á møti hvørja ferð).

Hóast vit hava hoyrt tað fleiri ferðir fyrr, og tað ljóðar sum ein kliché, so er tað mítt ynski, at okkara fakfelag er eitt felag, sum stendur saman, bæði í friðartíð, men eisini tá á stendur í samráðingum.

## Valgrein, nevndin, Beinta Klakstein:

# VIT HAVA ÁBYRGD AV FAKLIGHEITINI



*Beinta Klakstein, námsfrøðingur, stillar upp til nevndina*

Eg eiti Beinta Klakstein, eri 44 ár og búgvi í Klaksvík, har eg eri fødd og uppvaksin. Eg bleiv útbúgvin Námsfrøðingur í 2008, sum var í seinna lagi, tí tað var jú tað, eg skuldi vera altíð, men tað tók mær eina løtu at finna út av tí. Harumframt havi eg tikið ymisk skeið, sum eg haldi hava víðka sjónarringin og gjørt meg klókari. Eg eri leiðari í Snjallubjallu, sum er frítíðarskúlin í Klaksvík. Eg eri gift og eigi trý børn.

Eg var 17 ár, fyrstu ferð eg arbeiddi í einum barnagarði. Hetta var umvegis átak hjá Klaksvíkar Kommunu, ið kallaðist "Ung í Arbeiði". Og eg kendi meg heima. Eg visti, at hetta var nakað, sum eg hevði tímað at gjørt meira av. Og tað gjørdi eg. Alt mítt vaksna lív havi eg arbeitt innan fyri námsfrøðiliga økið, og tað geri eg enn.

Eg elski mítt fak, og tað er rættiliga sjáldan, at eg fari suffandi til arbeiðis, men eg suffi onkuntíð, tá eg hoyri, hvussu vit enn verja okkum og siga, at vit ikki verða vird og so framvegis. Tíverri enda vit ofta í offurleiklutinum. Og tað eri eg rættiliga troytt av at hoyra uppá og undrist yvir, hví tað enn er soleiðis. Vit skulu ikki átaka okkum handan leiklutin, men vit skulu standa upp fyri okkara faki og koma meira á banan.

Eg bjóði meg fram sum valevni til Føroya Pedagogfelag, tí at eg haldi, eg kann vera við til at gera ein mun. Eg veit, tað er vorðið rættiliga nógv ein kliché at siga soleiðis, men eg meini tað.

Eg haldi ikki, tað er neyðugt hjá mær at siga, at løn, eftirløn, arbeiðstíð, arbeiðsumstøður og arbeiðstreytir hjá námsfrøðingum í fólkaskúlanum, møguleikar hjá hjálparfólki at fáa sær útbúgving, arbeiðskor á serøkinum og nógv afturat skal verða betur. Tað skal tað!

Men eg haldi avgjørt, at vit skulu gerast betur til at vera tann greiða og fakliga røddin í øllum viðurskiftum, ið umfata tey menniskju, vit eru um. Vit skulu tora at seta spurningar um tilgongdir, sum eru í gongd í politiska og samfelagsliga landslagnum, sum umfata okkara fakøkið, áðrenn avgerð verður tikin. Vit skulu tora at seta kritiskar spurningar, og tað byrjar hjá okkum sjálvum.

Eg vil vera ein av teimum røddunum.

NEVNDARVALIÐ

**Valgrein, nevndin, Sæbjørn Johannesen:**

# SENIORPOLITIKKUR, FRÍTÍÐARNÁMSFRØÐI, SERNÁMSFRØÐI

Felagið skal umboða okkum øll, á øllum okkara ymisku arbeiðsøkjum eins og lesandi, soleiðis at limir kenna seg sædd, hoyrd og vird.

Eg eiti Sæbjørn Johannesen og eri 55 ára gamal. Eg eri uppvaksin úti í Hesti, og flutti sum tannáringur til Havnar at ganga í skúla. Eg las námsfrøði á Føroya Lærara- og Pedagogskúla og gjørdist námsfrøðingur í 1997.

Eg byrjaði at arbeiða á Eirargarði í 1990, og síðan tá havi eg arbeitt á sambýlum og umlætting í nógv ár. Tey síðstu 10 árini havi eg starvast í Barna- og Ungdómshúsinum Margarinfabrikkin og í sambýlinum undir Gráasteini 4.

## Seniorpolitikkur

Saman við landi og kommunum skulu vit arbeiða við einum seniorpolitikki, sum gevur seniorum møguleika at tillaga støv síni ímóti endanum av okkara arbeiðsføru tíð 60+ ár. Nógvastaðni er torført at seta námsfrøðingar í námsfrøðingastørvini, og um tað so eisini er torført at halda fast í royndu námsfrøðingunum, sum hava nógv ár úti í arbeiðslívinum, kann verða ógvuliga torført at tryggja, at fakligheitin er nóg góð á stovnunum.

Tá ið mann er farin upp um tey 60 árini, kann tað fyri summi tykjast ov tungt og hart at arbeiða 40 tímar um vikuna, og í eitt nú nógvum larmi allan dagin.

Vit eiga tí at arbeiða fyri, at tað skal verða møguligt at tillaga størvini soleiðis, at fólk orka at vera í sínum starvi sum longst. Tí mugu vit kunna gera individuellar loysnir við fleksibiliteti í arbeiðstíð, uppgávum og øðrum.

Í kanning sum BUPL vísir á, eru tað tey sum eru 50+, sum trívast best á arbeiðsmarknaðinum. Tey hava eina rúgvu av vitan og royndum, sum tørvur er á at breiða út og brúka sum longst.

## Frítíðarnámsfrøði

Frítíðarnámsfrøði tekur støði í arbeiðinum við trivnaðinum hjá børnum og ungum. Tríggjar høvuðssúlur eru í frítíðarnámsfrøði, og tær eru relatiónir, felagsskapir og dannilsi. Fram til í dag er millum lítið og einki at hoyra til og um frítíðarnámsfrøði, hóast mong ymisk frítíðartilboð, so sum frítíðarskúlar, frítíðarheim, barna- og ungdómshús og onnur dagtilboð, hava verið til í mong, mong ár. Børn og ung, óansæð førleikar, hava tørv á hesum stovnum og tey hava tørv á góðum relatiónum, sunnum felagsskapum og at verða vegleidd í dannilsi, sum námsfrøðiligu starvsfólkini kunnu geva teimum.



*Sæbjørn Johannesen, námsfrøðingur, stillar upp til nevndina*

Vit sum felag og samfelag eiga tí at verða tilvitað um frítíðarlívið hjá børnunum og seta fokus á frítíðarnámsfrøði, sum er við til at tryggja trivnaðin hjá børnum og ungum.

## Sernámsfrøði

Sernámsfrøðin er ein stórur partur av námsfrøðiligu størvunum hjá bæði landi og kommunum. Vit sum felag eiga fyrst og fremst at arbeiða fyri, at sernámsfrøðiligir stovnar eru mannaðir við námsfrøðingum. Tað liggur í orðinum sernámsfrøði, at tað ikki kann vera ein og hvør fakbólkur, sum arbeiðir á økinum. Sernámsfrøði fevnir um sera ymisk og samansett arbeiðsøki. Arbeitt verður við børnum, ungum, vaksnum og eldri borgarum í øllum lívsins viðurskiftum, nátt sum dag.

Á sernámsfrøðiliga økinum er tað tí ógvuliga týdningarmikið, at eitt nú arbeiðstíðarreglur og arbeiðsumstøður eru til gagns fyri starvsfólk og tey menniskju, sum vit arbeiða við. Hetta fyri at skapa kontinuitet, fleksibilitet og tryggleika.

Hesi evni ynski eg at seta sjóneykuni á og at arbeiða fyri.

**Valgrein, nevndin, Nikkil Heinesen:**

# PENGAR! PENGAR! PENGAR!

Góðu samverkafólk. Nú vil eg aftur biðja um tykkara álit til framhaldandi at røkja nevndarsessin í Føroya Pedagogfelag, sum eg fyrstu ferð fekk litið upp í hendurnar í 2015.

Eg havi eftir bestu sannføring roynt at røkt álitið, mær hevur verið givið. Men eg skal vera tann fyrsti at viðganga, at okkurt kundi verið gjørt øðrvísi.

Eg varð útbúgvin námsfrøðingur í 2012 og havi líka síðan arbeitt við børnum og ungum í frítíðarskúla og ungdómshúsi. Kona mín og eg búgva í Hoyvík og hava trý fantastisk børn.

Sum felag eiga vit at verða nógv sjónligari í almennu miðlunum og rópa hart, tá limir okkara eru í truplum støðum.

Eg havi valt at brúka yvirskriftina Pengar! Pengar! Pengar!, tí tað er hetta, sum fakfelagsarbeiðið í botn og grund snýr seg um.

## Nakað eg vil arbeiða við

**Hægri løn** – Ein løn, sum tað ber til at liva av, og ein løn, sum avspeglar okkara ábyrgd og útbúgving! Eftirløn er eisini løn, og eftirløn skal á allar viðbøtur.



*Nikkil Heinesen stillar upp aftur til nevndina*

**Fólkaskúlin** – Námsfrøðingar í fólkaskúlum SKULU í øllum umstøðum virka undir somu treytum sum starvsfelagarnir!

**Minimumsnormeringar** – Eg eri nývaldur í Dagstovnaráðið, og her vil eg serliga brúka sessin at arbeiða fyri lóg um minimumsnormeringar!

- vøggustova: max 3 børn pr. starvsfólk
- barnagarður: max 5 børn pr. starvsfólk.
- frítíðarskúli: max 9 børn pr. starvsfólk.

Eyka tørvur og "sertímar" eiga sjálvsagt at koma omaná hetta.

## Tinganes spælt falit

Samráðingar í dag taka ikki hædd fyri, hvat barnið/borgarin hevur tørv á, ella hvussu vit skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi til okkum starvsfólk, og um vit fáa eina rættvísa løn. Tað snýr seg einans um, hvat passar best inn í rokniarkið úti í Tinganesi.

Pedagogfelagið hevur fingið krøv um at LÆKKA byrjunarlønir, frásiga sær verkfallsrætt og afturfyri fáa eina reella lægri lønarhækkan enn onnur fakfeløg.

Hetta farið eg aldrin at taka undir við og vil stríðast fyri, at vit fáa uppiborna lønarhækkan, sum ger tað møguligt at liva av okkara starvi.

## Vit skulu siga stopp, og gera OKKARA arbeiði!

Umsorganarøkið er spart inn á bein, og fleiri uppgávur koma á okkum, men nú siga vit stopp! Vit eru ikki sett til til dømis at vaska klædnaklivar og gera høvuðsreint. Hetta er ikki okkara arbeiðsuppgáva.

Vit skulu verða góð við okkara arbeiðspláss og røkja tað sum okkara egna, men ynskja land og kommunur væl hildnar stovnar, so mugu tey seta fígging av til hesar uppgávur. Vit eru serfrøðingar í menniskjanum, og tað er til hetta, vit eru sett til.

## Minimumsnormering og arbeiðstíðarreglar alt fyri eitt!

Okkara arbeiði er eitt uppalandi, mennandi og mentanarligt arbeiði, har ein faklig uppílegging og ábyrgd liggur á okkum at skapa eitt námsfrøðiligt rúm, sum ber brá av, at barnið/borgarin upplivir lívsgleði, áhuga, tryggleika, hugbirting, umsorgan og soleiðis fær gróðrarbotn til víðari menning.

Umsorgararbeiði tekur tíð og skal hava ta tíð, tað tekur. Tí hevur tað alstóran týdnig at fáa minimumsnormeringar, og at sáttmálin gevur minst fimm tímar fyrireiking um vikuna.

## Arbeiðstíðarreglur

Tað hevur skund at dagføra arbeiðstíðarreglurnar fyri landsins stovnar, soleiðis at teir tryggja okkum javnbjóðis rættindi, sum tey vit arbeiða saman við.

Eisini inni í fólkaskúlanum er stórur tørvur á at fáa skipað viðurskiftið. Tað gevur onga meining, at námsfrøðigar í skúlum ganga lið um lið við starvsfelagar, sum hava heilt aðrar og nógv betri treytir at arbeiða undir – hetta skal broytast soleiðis, at vit hava somu ágóðar og umstøður at arbeiða undir.

Góðu limir, eg havi verið í hesum leingi, og veit tí, hvat hetta inniber. Um tit velja meg, so velja tit ein, sum ikki er bangin fyri at siga frá, brennir fyri sakini og sum stríðist fyri rættvísið og betri løn í arbeiði!

## Valgrein, nevndin, Harald Joensen:

# TAÐ ER RÍKILIGT AT TRÍVA Í

So er aftur nevndarval, og eg standi fyri vali. Spurningurin er so, um ein skal stilla upp aftur ella ikki, og fleiri hava eisini sett mær henda spurningin. Ja, sjálvandi stilli eg upp aftur, tí eg haldi ikki, at mítt arbeiði í nevndini er liðugt enn.

Fakta um meg: Eg eri 30 ár og útbúgvin námsfrøðingur frá Fróðskaparsetri Føroya í 2021. Eg hevði sæti í nevndini 2020-2022, var varðalimur 2022-2023 og aftur nevndarlimur 2023-2024. Eg eri dagstovnaleiðari í Sankta Jósefs Barnagarði, havi starvast á bú- og viðgerðarstovni fyri børn og ung við autismu síðan 2016 og havi 11 ára royndir á dagstovnaøkinum og sosialnámsfrøðiliga økinum.

Fyri meg hevur tað týdning, at nevndin ger eina langtíðarætlan fyri alt tað námsfrøðiliga økið, og við hesum haldi eg eisini, at tað krevur eina støðunevnd, sum kann arbeiða í eitt longri tíðarskeið við hesum málum og ikki minst, nú sáttmála-samráðingarnar eru í gongd.

Tí stilli eg upp aftur til nevndina á aðalfundinum hjá felagnum 2. mars 2024.

Nøkur av mínum hjartamálum, sum eg vil arbeiða fyri, eru millum annað námsfrøðin, lønarviðurskifti, arbeiðsumhvørvi og so framvegis.

### Námsfrøðin

Nevndin eigur at arbeiða við náms-frøðini og fáa breitt boðskapin og



*Harald Joensen stillar upp til nevndina í Føroya Pedagogfelag*

týdningin av námsfrøðini út í almenna rúmið, vit eru jú røddin hjá tykkum limum, og eigur og skal felagið verða oddafólkið í hesum.

Aktións- og upplýsingargrunnurin hjá Pedagogfelagnum er ein grunn-ur, har limir kunnu søkja um stuðul til virksemi, sum er við til at granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí námsfrøðiliga arbeiðnum. Grunnurin kann eisini taka stig saman við nevndini, har

man styrkir um tann námsfrøðliga partin, eitt nú við at skipa fyri fakfagnaði og øðrum, ið setur námsfrøðina á breddan.

Eg vil fegin arbeiða fyri, at grunnurin saman við nevndini leggur til rættis ymiskt virksemi, sum kemur námsfrøðini til góðar, og har vit fáa breitt út okkara kunnleika um námsfrøðina – millum limirnar, í almenninginum og ikki minst í tí politisku skipanini.

## Løn

Felagið er til fyri teg, og tí skal felagið altíð arbeiða fyri betri korum til limirnar. Fyri at betra um lønarviðurskiftini haldi eg, at vit eiga at hyggja burtur frá verandi lønartalvu og fara í holt við eina nýggja lønartalvu, har hugsað verður í ørvísi banum.

Tí eg meti, at við einari slíkari ætlan, kunnu vit rætta uppá ymiskar vansar, sum verandi lønartalva gevur. Eitt nú skeivleikan viðvíkjandi starvsaldri hjá limum, soleiðis at øll verða lønt eftir rætta starvsaldrinum. Viðbótin hjá tænastummonum verður umløgd til løn og so framvegis.

Politiska skipanin hevur ásett eitt lønarflyft til limir í Føroya Pedagogfelag, og er hettar at fegnast um. Eg meti, at við einari nýggjari lønatalvu og lønarlyftinum kunnu vit rætta uppá ein stóran part av tí søguliga skeivleikanum, sum hevur veri nógv tey síðstu árini.

## Viðbøtur

Fyri limir, sum arbeiða skeivar arbeiðstíðir og skiftandi vaktir, hevur tað týdning, at felagið arbeiðir við at tillaga hesar viðbøtur soleiðis, at tær eru tíðarhóskandi. Eg haldi ikki, at tær í dag eru nøktandi, men við einari nýggjari lønartalvu kunnu hesar viðbøtur skjótt rættast til. Viðbøturnar eru í dag ikki eftirlønargevandi, og hettar er nakað, sum eg slett ikki kann góðtaka, og tí fari eg at arbeiða hart fyri at fáa hesar viðbøtur at vera eftirlønargevandi, sum eg haldi vera eina sjálfylgju.

## Arbeiðsumhvørvið

Eitt av mínum kjarnumálum er arbeiðsumhvørvið. Eitt nú at fáa arbeiðstíðarreglur fyri alt tað námsfrøðiliga økið og at endurskoða verandi arbeiðstíðarreglur hjá landinum.

Vit eiga og skulu ikki undirmeta eitt gott arbeiðsumhvørvi, tí eg meti, at tað hevur alt at siga í okkara dagliga arbeiði. Eitt gott sálarligt arbeiðsumhvørvi hevur við sær trivnað og arbeiðsgleði, sum hevur alstóran týdning í tí námsfrøðiliga arbeiðnum.

## Títt val

Um tú kæri limur ert samdur við mær í hesum málum, sum eg vil arbeiða við í nevndini, so vóni eg at fáa tína atkvøðu á nevndarvalinum. Afturfyri skal eg lova tær, at mín lutur ikki skal liggja eftir, verði eg valdur inn aftur í nevndina.

Eg fari at ynskja tær og øllum ein góðan aðalfund.

**Valgrein, Leiðararáðið, Mirjam Johannesen:**

# LEIÐARARÁÐIÐ SKAL STYRKJAST



Tað eru fýra valevni til tríggjar sessir í Leiðararáðnum hesa ferð:

- Elin N. W. Tausen
- Elisabeth Henriksen
- Mirjam Johannesen
- Turið Horn

Valgreinarnar hjá valevninum til Leiðararáðið kunnu lesast á hesi og næstu síðunum.

*Mirjam Johannesen stillar upp aftur til Leiðararáðið*

*Mynd: Kári við Rættará*

Eg havi gjørt av at stilla upp aftur til Leiðararáðið.

Eg eiti Mirjam Johannesen og eri útbúgvin námsfrøðingur á Frøbelseminarium í Keypmannahavn í 1988. Umframt tað havi eg tikið leiðsluútbúgvingar og nógv leiðsluskeið gjøgnum tíðina.

Tey fyrstu árini starvaðist eg sum námsfrøðingur á Føroya Barnaheimi,

men frá 1994 til 2003 starvaðist eg í leiðsluni á Barnaheiminum. Síðan 2005 havi eg starvast sum dagstovnaleiðari á Dagstovninum Sólareygað í Tórshavnar kommunu, so royndirnar havi eg nógvar bæði á serøkinum og dagstovnaøkinum.

Eg eri í leiðararáðnum í skrivandi stund. Meðan eg havi sitið í ráðnum, hava vit til dømis skipað fyri tveimum leiðslufakligum døgum um árið.

Vit hava fylgt við, tá leiðsluskipanir eru blivnar broyttar, vit hava úttalað okkum alment um óhepnar umstøður hjá leiðarunum og annars givið umstøðunum hjá leiðarunum á námsfrøðiliga økinum gætur.

Í løtuni eru vit í Leiðararáðnum í gongd við at kanna, hvussu onnur reka líknandi feløg ella ráð. Vit eru forvitin eftir at vita, hvussu vit kunnu tryggja, at øll trý ráðini – Leiðararáðið, Námsfrøðingaráðið og Hjálparfólkaráðið – kunnu styrkjast.

## Vil styrkja ráðið

Tað liggur mær sera nógv á hjarta at styrkja Leiðararáðið, og at kunna siga, at eg eri partur av einum sterkum felag, har ráðini hava eina sterka rødd og harvið ein kveikjandi leiklut, tá tað um námsfrøðiliga økið ræður.

Eg haldi, at hóast vit eru eitt sera stórt og fjølbroytt felag, eiga vit at arbeiða fram ímóti at gerast meira sjónlig á øllum mótum.

Eg eri ikki bangin fyri at siga mina meining alment og at seta orð á tað, sum eg haldi treingja til at verða sett í brennidepilin.



Eg haldi tað vera týdningarmikið at varpa ljós á okkara øki, ikki bert tá samráðingar standa fyri framman, men sanniliga eisini í " friðartíð", tí tað er tá, at vit veruliga kunnu vera við til at varpa ljós á okkum sjálv.

Við einum sterkum Leiðararáði kunnu vit eisini vera við til at varpa ljós á leiðsluumstøður generelt í Føroyum – á leiðslu sum fak og annars hava fingurin á pulsinum, tá tað ræður um trivnað hjá teim ymsu leiðarunum kring landið.

Hetta er nakað, eg framhaldandi vil arbeiða við, um eg aftur verði vald í Leiðararáðið.

**Valgrein, Leiðararáðið, Elisabeth Henriksen:**

# LEIKLUTURIN HJÁ RÁÐUNUM EIGUR AT STYRKJAST

 Eg varð útbúgvin námsfrøðingur í 1994 og havi arbeitt innan økið síðani tá. Eg havi royndir bæði innan dagstovnaøkið og serøkið. Seinastu nógvu árini havi eg arbeitt sum leiðari; eitt skifti í Vøggustovuni við Velbastaðvegin, síðan varð eg fyrsti leiðarin á Dagstovninum á Hamrinum. Seinastu 11 árini havi eg verið leiðari á serøkinum, fyrst sum eindarleiðari og nú sum leiðari á Verkstaðnum Vón og tveimum frítíðarklubbum.

Eg havi sitið í Leiðararáðnum trý tey seinastu árini og bjóði meg at halda fram. Eg vil gjarna arbeiða fyri at bøta um arbeiðskorini hjá námsfrøðiligu leiðarunum og vera við til at styrkja fakliga samleikan hjá hesum fakbólki.

Pedagogfelagið er vorðið eitt av størstu fakfeløgum í landinum. Limirnir starvast innan fjølbroytt øki, og tað kann tí vera ringt hjá nevndini einsamallari at røkka áhugamálunum hjá øllum limunum. At verða leiðari er ein serligur leiklutur, og góð leiðsla er ein fortreyt fyri at skapa góð arbeiðspláss fyri starvsfólkini. Tí hevur tað týdning, at leiðarin hevur góðar arbeiðsumstøður og gott arbeiðsumhvørvi at virka í.

Nakað av tí, vit sum Leiðararáð hava lagt dent á hesi seinasti trý árini,



*Elisabeth Henriksen, stillar upp aftur til Leiðararáðið*

hevur verið at skipa fyri fakligum døgum.

Endamálið er, at leiðarar hittast, sparra við aðrar leiðarar og fáa íblástur í leiðaraleiklutinum.

Eg haldi, tað hevur stóran týdning at hava eitt vælvirkandi leiðararáð, sum heldur eyga við áhugamálunum hjá leiðarunum í felagnum.

Eg meini, at felagið eigur at styrkja leiklutin hjá ráðunum, tá tað snýr seg um at menna strategiska arbeiðið hjá felagnum, ikki minst mótvegis politisku skipanini.

Eg vil arbeiða fyri at Leiðararáðið gerst enn meira virkið á hesum øki, so vit veruliga fáa viðurskiftini hjá leiðarunum á breddan.

### Valgrein, Leiðararáðið, Elin N. W. Tausen:

# RÁÐIÐ ER EIN LONGDUR ARMUR HJÁ NEVNDINI

Eg eiti Elin N. W. Tausen, eri dagstovnaleiðari á Argjum og havi avgjørt at bjóða meg fram sum umboð í leiðararáðnum hesa ferð.

Eg havi, síðan eg bleiv útbúgvin námsfrøðingur í 2008, havt stóran áhuga fyri fakfelagsviðurskiftum, og hevði eg møguleikan at sita í nevndini hjá Pedagogfelagnum í næstan 10 ár. Hetta var ein krevjandi og spennandi uppgáva og samstundis eitt læruríkt tíðarskeið, sum gav mær eitt stórt innlit í viðurskiftini kring sáttmálaviðurskifti og arbeiðsviðurskifti hjá limunum í Føroya Pedagogfelag.

Seinastu árini havi eg verði partur av fakliga áhugabólkinum "Dagstovnanámsfrøði í Føroyum", har vit gjøgnum limakvøld og greinaskiving hava savnað tilfar um dagstovnanámsfrøði í Føroyum.

Eg havi avgjørt at bjóða meg fram sum lim í Leiðararáðum, tí eg síggi ráðini sum ein longdan arm hjá nevndini, har ráðið er ein sparringspartnari hjá nevndini í fakfelagsviðurskiftum og arbeiðsumstøðum hjá leiðarum. Samstundis er ráðið eitt stað, har arbeiðast kann við teimum avbjóðingum, sum leiðarar standa við í sínum starvi.

Eg haldi, at tað er spennandi at hava møguleikan at kunna hugsavna seg um viðurskiftini hjá leiðarunum í felagnum. Eg haldi, at tað hevur týdning, at leiðarar hava eitt sterkt ráð, sum er virkið í at tosa fakligu áhugamálini hjá leiðarum fram, umframt at skipað verður fyri tiltøkum og skeiðum, sum eru við til at styrkja fakliga profilin hjá námsfrøðiligum leiðarum.

Takk fyri møguleikan at bjóða meg fram sum valevni.


*Elin N. W. Tausen, valevni til Leiðararáðið*

LEIÐARARÁÐIÐ

**Valgrein, Leiðararáðið, Turið Horn:**

# VAKIN OG VIRKIN OG FOKUS Á LEIÐSLU

Eg stilli upp til Leiðararáðið. Eg eiti Turið Horn, eri 56 ár, og eg arbeiði sum leiðari í býlingshúsinum á Flat.

Eg havi sitið í leiðararáðnum eina setu, mær hevur dámt sera væl, og tí velji eg eisini at stilla uppaftur.

Eg haldi, tað hevur stóran týdning fyri okkum leiðarar, at vit hava okkara ráð í felagnum. Eitt ráð sum er vakið og virkið, og at vit, sum eru í ráðnum, hava fokus á leiðslu og eru við til at menna leiðsluøkið, bæði á dagstovnaøkinum og á serøkinum. At vit eru virkin og hava áhuga í hvat rørir seg her heima í Føroyum og somuleiðis hvat rørir seg í londunum rundan um okkum. At vit sum ráð áhaldandi arbeiða við at menna okkum leiðarar og fáa góð og spennandi fólk heim higar at hava fyrilestrar og skeið.

Hetta hevur eydnast sera væl seinastu árini, tá vit hava skipað fyri leiðararáðstevnu. Eg eri ein, sum fái nógva orku av hesum arbeiði og somuleiðis gleðist yvir at vera við til at menna økið og fakið. Eg bjóði meg fram aftur, tí eg føli ikki, at eg eri liðug enn, og eg vil fegin halda fram at arbeiða fyri okkum leiðarar í Føroya Pedagogfelag.



*Turið Horn stillar upp aftur til Leiðararáðið*

## Eitt valevni til Námsfrøðingaráðið

Tað er eitt valevni til tveir sessir í Námsfrøðingaráðnum hesa ferð:

• Sigrun Ørvarodd

Sigrun Ørvarodd er einasta valevni og er tískild longu vald. Roynt verður at fáa valt fólk í hin tóma sessin á aðalfundinum. Tó at hon longu er vald, verður valgreinin hjá Sigrun Ørvarodd prentað her á síðuni.

**Valgrein, Námsfrøðingaráðið, Sigrun Ørvarodd:**

# EIN MENNISKJARÆTTUR AT VERÐA SÆDD OG HOYRD

Eg eiti Sigrun Ørvarodd og eri kona, mamma, omma, vinkona, námsfrøðingur, starvsfelagi, álitisfólk – og so eri eg virkandi limur í Námsfrøðingaráðnum.

Øll hesi heiti bera brá av, at eg støðugt eri í einari relatión við onnur, og tí er tað av týdningi, at eg eri tilvitað um, í hvønn mun mín relatión, samskifti og samspæl kann hava ávirkan á, hvussu menniskju rundan um meg síggja seg sjálvi.



*Sigrun Ørvarodd stillar upp til Námsfrøðingaráðið, og sum higartil einasta valevni er hon longu vald*

At hava eina góða relatión við onnur er sera týdningarmikið fyri okkum menniskju – at kenna seg at hoyra til og sum ein part av heildini. Tað er ígjøgnum relatión við onnur, at vit verða myndað og læra okkum sjálv at kenna, at hugsa og gerast sjálvstøðug. Tann góða relatiónin er merkt av vinsemi, virðing, nærveru, tolsemi, forvitni, undran, lurtan og so framvegis. Tað er stórt, at eg við tilvitaðari menniskjaáskoðan, tað veri seg, barna-, foreldra- og starvsfolkaáskoðan, kann vera við til at blíva myndað og at mynda menniskju rundan um meg.

Eg havi verið útbúgvin námsfrøðingur síðani summarið 2017, og áðrenn hetta starvaðist eg á dagstovnaøkinum í góð trý ár. Eg havi starvast í barnagarði, vøggustovu, frítíðarskúla og ungdómshúsi og sostatt við børnum og ungum í øllum aldri, og eitt, sum allir hesir aldursbólkar við vissu hava í felag, er, at øllum tørvar at blíva sædd, hoyrd, vird og skilt. Hetta er ein grundleggjandi menniskjarættur.

Í einari roynd at blíva hugkveikt og at kunna hugkveikja onnur við tí vitan og førleikum, eg kann bjóða inn við, havi eg valt enn einaferð at stilla upp til Námsfrøðingaráðið og harvið verða við til at varpa ljós á námsfrøðina, sum hevur stóran týdning fyri meg, og ta góða arbeiði, allir okkara námsfrøðingar runt um landið gera.

Takk fyri og gott val

# Soleiðis virkar valskipanin

Valskipanin letur upp 14. februar og steingir á middegi 1. mars.

**1.**
Tú fært ein teldupost frá “survey.exact.dk” við heitinum **“Pedagogfelagið, val av forfólki, nevndarlimum og Leiðararáðslimum 2024”**. Telduposturin inniheldur eitt leinki, ið tú síðani skal trýsta á. Leinkið leiðir teg til atkvøðusíðurnar.

*Um tú ikki hevur móttikið teldupostin mikudagin 14. februar 2024, kann tað vera, at
a) Telduposturin er farin í spam/uønsket mail/óynsktur teldupostur ella líknandi.
b) Føroya Pedagogfelag hevur skeivan teldupost ella ongan teldupost hjá tær, send so teldupost til pedagog@pedagogfelag.fo at kanna tíni viðurskifti.
c) Tú ert ikki limur. Send teldupost til pedagog@pedagogfelag.fo fyri at kanna tíni viðurskifti.

**2.**
Fyrsta síðan gevur tær eitt yvirlit yvir, hvør stillar upp til forfólkasessin við mynd. Trýst á “Næste” fyri at koma til sjálva atkvøðusíðuna.

**3.**
Á atkvøðusíðuni sært tú nøvnini á teimum báðum valevnunum til forfólkavalið. Tú kanst atkvøða við at velja navnið á valevninum, tú ætlar at velja, ella tú kanst velja blankt. Trýst síðan á “Næste”.

**4.**
Tú ert nú á síðuni við yvirlitinum yvir tey seks, sum stilla upp til nevndina, við mynd. Trýst á “Næste” fyri at koma til sjálva atkvøðusíðuna.

**5.**
Á atkvøðusíðuni sært tú nøvnini á teimum fimm valevnunum til nevndarvalið. Tú kanst atkvøða við at velja navnið á valevninum, tú ætlar at velja, ella tú kanst velja blankt. Trýst síðan á “Næste”, og um tú ikki ert leiðari, trýst so á “Afslut”, og tín atkvøðugreiðsla er endað.

Leiðarar verða beindir víðari at velja til Leiðararáðið.

**6.**
Ert tú leiðari, ert tú nú á síðuni við yvirlitinum yvir tey fýra, sum stilla upp til Leiðararáðið, við mynd. Trýst á “Næste” fyri at koma til sjálva atkvøðusíðuna.

**7.**
Á atkvøðusíðuni sært tú nøvnini á teimum fýra valevnunum til Leiðararáðið. Tú kanst atkvøða við at velja navnið á valevninum, tú ætlar at velja, ella tú kanst velja blankt. Trýst síðan á “Næste”.

**8.**
Enda atkvøðugreiðslu tína við at trýsta á “Afslut”.

Valskipanin til nevndarvalið letur aftur fríggjadagin 1. mars klokkan 12.00.

Valskipanin verður umsitin av J. Herluf Sørensen, og úrslitini verða kunngjørd á aðalfundinum.

Lækkaðir umsitingarkostnaðir

# Allur ágóðin fer til tín



## Tað er vorðið enn bíligari at vera kundi í LÍV

Við miðvísum arbeiði hava vit enn einaferð
megnað at lækka umsitingarkostnaðin.
1. januar 2024 fór umsitingarkostnaðurin
**úr 4 prosentum** niður **í 3 prosent.**
Harafturat lækkaði fasti árligi kostnaðurin
**úr 180 krónum** niður **í 150 krónur.**

liv.fo

títt